| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**16. juni 2011** | Blað nr.:<br>**9084**<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **16. juni 2011** **kl. 16.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:116/11-142/11**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Elin Lindenskov
Annfinn Brekkstein
Inga Dahl
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓKU IKKI:**
Vagnur Johannesen, sum hevur farloyvi
Maria H. Olsen, ið hevði forfall

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Bjørgfríð Ludvig
Bárður Larsen

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**122/11** **2011-0172**

**Vagnur Johannesen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Inga Dahl, eru loknar.

**Býráðið 16. juni 2011:** Samtykt.

**123/11** **2011-0217**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 16. juni 2011:** Framlagt.

**124/11** **2005-0846 GS**

**Semja við Heina á Borg í sambandi við afturtøku av byggiloyvi á matr. nr. 1449, Tórshavn**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**

Heini á Borg hevur 29. juni 2005 fingið byggiloyvi til at hækka trom á sethúsum og at gera nýggja taktrom á verandi bilhús.

Byggideildin hevur eftirfylgjandi varnast, at byggiloyvi í sambandi við hækkan av taktromini á bilhúsi ikki er í samsvari við galdandi byggisamtykt, og bað umsøkjara steðga við byggingini, meðan málið varð kannað, j. nr. 2005-0846/11

Umsøkjarin fekk síðan í skrivi boð um at byggiloyvi varð afturtikið, j. nr. 2005-0846/12

Á tveimum fundum millum byggideildina og umsøkjara er komið fram til eina loysn, har takið á bilhúsi verður lækkað niður á upprunarligu hædd og at bygningurin, ið er samanbygdur við bilhúsið verður lækkaður, soleiðis at báðir bygningarnir vera í somu hædd. Partarnir eru vornir samdir um kostnaðarætlanina í sambandi við broytingarnar.

**Fíggjarligt:**
Tórshavnar kommuna kann koma at luttaka í gjaldininum fyri niðurtøku og uppseting við uml. kr. 100.000.

**Skjøl:**
Kostnaðarmeting j. nr. 2005-0846.
Nýggjar tekningar j. nr. 2005-0846.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at geva byggiloyvi til nýggju tekningar og luttaka í gjaldinum fyri niðurtøku og uppseting.

Framløgd var grannaváttan 2005-0846/26 frá Fríðriki Bláhamar um at hann tekur undir við at bygt verður eftir nýggju tekningunum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. september 2005:** Nevndin samtykti at geva byggiloyvi sum frávik sambært tekningunum j.nr. 2005-0846/18, og at kommunan luttekur í gjaldinum fyri niðurtøku og uppseting burtur av játtan hjá byggi- og býarskipanardeildini.

-Byggieftirlitið hevur staðfest at bygt verður ikki í samsvari við loyvi frá byggi- og býarskipanarnevndini.

Eigarin hevur fingið álagt at steðga við byggingini, men arbeiðið hevur hildið fram.

Byggieftirlitið hevur heitt á sakførararvirkið at stevna eigaran eftir at taka tað ólógliga bygda niður. Orsøkin er, at nú er víddin av bilhúsinum uml. 100 $m^2$. Harumframt eru brunaviðurskiftini ikki í lagi.Málið er lagt fyri Føroya Rætt.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mai 2006:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við viðgerðina av málinum í Føroya Rætti var spurningurin um semju ella dóm viðgjørdur. Løgfrøðiligi ráðgevi kommununar mælti til, at biðja um dóm, tí talan var um so stór frávik, bæði hvat viðvíkur bygging í mark og støddin á garaguni, eins og talan var um ólógliga innrætting av parti av bygninginum.

Kjarnin í málinum er, at tekningarnar sum umsøkjarin sendi inn vístu ikki eitt hálvtak móti grannamarkinum. Tá umsøkjarin so eftir at hava fingið byggiloyvi sum frávik heldur uppá, at hálvtakið hevur verið har síðani í 60´unum og hann tók tað sum eina sjálvfylgju at tað bleiv standandi, má sigast at umsitingin og byggi- og býarskipanarnevndin í veruleikanum hava játtað honum byggiloyvi á skeivum fortreytum 15. sept. 2005. Harumframt hava vitjanir á staðnum so eisini víst, at hetta sum fyrr var hálvtak, nú er fult innrættað og blivin ein partur av garaguni, sum nú er uml. dupult so stór sum byggisamtyktin loyvir.

Føroya Rættur hevur felt dóm í málinum millum Heina á Borg og kommununa, og hevur givið kommununi viðhald í, at endaveggirnir undir hálvtekjuni móti grannamarkinum skulu takast burtur, og at rúmið undir hálvtekjuni sostatt ikki kann innrættast.

Heini á Borg hevur kært dómin í Føroya Rætti til Landsrættin, og hevur í hesum sambandi biðið um sýn og meting, har spurt verður um tað tøkniliga ber til at gera tað sum er ólógliga bygt brunatrygt. Niðurstøðan er, at tøkniliga letur tað seg gera, men samstundis viðførir tað so enn størri frávik frá byggisamtyktini enn tað sum higartil er játtað.

Tekniska umsitingin metir kortini, at málið snýr seg ikki um hvørt tað tøkniliga ber til at fremja brunatryggar loysnir, men at kjarnin í málinum er, at umsøkjarin hevur ikki sent inn rættvísandi tekningar, og hevur harumframt bygt ólógliga. Byggiloyvi sum honum er játtað í 2005 er tí givið á skeivum grundarlag. Uttan mun til um tað tøkniliga ber til at fremja brunatryggar loysnir, so merkir hetta, at byggingin krevur enn størri frávik enn tað sum játtað er frammandunan.

Umsøkjarin hevur nú, hóast hann hevur kært dómin í Føroya Rætti til Landsrættin, søkt um at byggi- og býarskipanarnevndin góðkennir garaguna sum hon nú stendur, men við at fremja tey brunatøknligu átøk sum krevjast fyri at byggingin lýkur brunakrøv. Harumframt biður umsøkjarin um at sleppa á fund við byggi- og býarskipanarnevndina at greiða nærri frá málinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til umvegis løgfrøðiliga ráðgeva kommununar at svara umsøkjaranum, at nevndin fer ikki at viðgerða nýggju umsøknina frá umsøkjaranum meðan málið er til viðgerðar í Landsrættinum, við tað at onki nýtt er í málinum sum gevur orsøk til at góðkenna tað ólógliga bygda, eins og talan er um størri frávik enn tað kommunan vanliga játtar.

Harumframt verður mælt til at kommunan biður um dóm í Landsrættinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. mars 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Málið hevur verið fyri í Landsrættinum, har dómur er fallin tann 30. oktober 2008. Dómurin sigur m.a.:

*"...Landsretten finder, at Torshavn Kommune er forpligtet til at tage stilling til den foreliggende dispensationsansøgning, før kommunen kan opnå dom for, at Heini á Borg skal fjerne bygningen mellem garagen og skellet...".*

Støða skal takast til umsóknina um frávik, frá Heina á Borg, (tekningar nr. 2005-0846/61, sum er dagfest 18. desember 2007), har biðið verður um at góðkenna hálvtakið, sum er innilokað við skrivstovu og einum rúmi, við at fremja tey brunateknisku átøkini, sum krevjast, fyri at byggingin lýkur brunakrøvini. Ein metingarmaður hevur víst á loysnir til at røkka hesum, og eru loysnirnar settar upp í skrivi, dagfestum 14. september 2007. Umsøkjarin hevur í umsóknini víst á loysn 2. (skrivið liggur í málinum)

**Frá umsitingini**
Støðan í dag er, at tað, sum fyrr hevur verið eitt hálvtak móti mark, møguliga við einum endaveggi, er gjørt til ein tilbygning, við tað at báðir endar eru innilokaðir við vindeygum og at skrivstova er í tilbygninginum.

Tekningarnar, sum innkomnar eru, vísa at breiddin á bygninginum er 2,05 m og longdin er 8,30 m. Hæddin inn við bilhúsveggin er 2,60 m. og út við mark 2,10 m. Tilbygningurin er íalt 17,01m$^2$ til víddar.

Umsøkjarin hevur frammanundan fingið frávik til eitt bilhús, sum er 82,8 m$^2$, sum byggilovi er til. Í tekningunum til ta umsóknina framgekk ikki, at eitt hálvtak ella tilbygningur var millum mark og bilhúsið. Hetta merkir, at frávik skal gevast til:
- Bygning á 17,01 m$^2$ afturat teimun 82,8 m$^2$, sum longu er loyvt til bilhúsið.
- At byggja tilbygning í mark.
- At longdin av bygninginum er 8,3 m. í mark.

Her er ikki talan um bilhús, tí í tí partinum, sum var hálvtak, er nú ein skrivstova og eitt annað rúm. Veggur er ímillum bilhúsið og tilbygningin við vindeyga innan og hurð. Í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu stendur:
*Kap. 4. § 26 stk. 6: Í 3. grundumráði skulu allar byggingar standa fyri seg, t.e. í minsta lagi 2,5 m frá markinum. Undantikin eru bilskúrar, bilskýli, skúr og smá úthús við ongum eldstaði.*

Um talan var um úthús, kann longdin ikki verða meir enn 8 m. í mark. Í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu stendur:
*Kap. 4. § 26 stk. 6a: Hesir smærru bygningar kunnu verða bygdir nærri grannamarki, tá ið hesar treytir verða loknar:*

*a. Longdin á bygninginum móti grannamarki, má ikki vera størri enn 8 m, Vendir bygningurin móti tveimum mørkum, má samlaða longdin ikki vera størri enn 12 m.*

Um talan var um bilhús, skal støddin av bilhúsinum góðkennast av byggvaldinum. Í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu stendur:
*Kap. 4. § 10 stk. 3: Bilskúrur og bilskýli við vídd, ið er størri enn 50 m², skulu í hvørjum einstøkum føri verða gjørd við serstakari góðkenning byggivaldsins.*

Við at geva loyvi kann talan verða um, at avgerðin dannar precedens, har onnur í 3. grundumráði kunnu søkja um loyvi at byggja tilbygningar í mark, og ikki bert úthús e.líkn.

Undir øllum umstøðum má byggingin gerast brunatrygg.

Vísandi til dómin í Føroya Rætti og tilmælið frá løgfrøðiliga ráðgeva kommununar um, at biðja um dóm í Landsrættinum, tí talan var um so stór frávik, bæði hvat viðvíkur bygging í mark og støddin á garaguni, eins og talan var um ólógliga innrætting av parti av bygninginum, eigur støða at takast til fyriliggjandi umsøkn frá eigaranum, um enn størri frávík, soleiðis sum ásett í dóminum í Landsrættinum.

Í hesum sambandi skal havast í huga, at tað frammanundan eru givin stór frávik til hesa bygging, og at kommunan í øðrum málum hevur givið noktandi svar vísandi til, at frávikini gerast ov mong í tali og ov stór. Játtandi svar í hesum málinum kann tí viðføra nýggja rættarsiðvenju (danna precendens).

Viðgerðin í nevndini eigur tí ikki einans at taka støðið í hvørt tað tøkniliga ber til at fremja brunatryggar loysnir, men at kjarnin í málinum er, at umsøkjarin hevur ikki sent inn rættvísandi tekningar, og hevur harumframt bygt ólógliga. Byggiloyvið sum honum er játtað í 2005 er sostatt givið á skeivum grundarlagi, og ein lógliggerðing av tí ólógligt bygda merkir, at byggingin krevur enn størri frávik enn tað sum játtað er frammandunan.

Um nevndin velur bert at leggja tøknilig viðurskifti til grund fyri eini semju, eru hesir møguleikar:

**Møguleiki 1**
At loyva at hálvtakið verður standandi, av tí at tað er bygt áðrenn byggisamtyktin kom í gildið, men at endaveggirnir skulu takast niður, tí tá endaveggir eru, er talan um ein bygning. Vísandi til almennu byggisamtyktina fyri A1 3. grundumráði, Kap. 4. § 26 stk. 6: *Í 3. grundumráði skulu allar byggingar standa fyri seg t.e. í minsta lagi 2,5 m frá markinum. Undantikin eru bilskúrar, bilskýli, skúr og smá úthús við ongum eldstaði.*
Haraftur at skal fremjast tey brunateknisku átøkini, sum krevjast fyri at byggingin lýkur brunakrøvini. Víst verður til skrivið frá metingarmanninum (er hjálagt).

**Møguleiki 2:**
At ganga umsóknini á møti sum frávik, treytað av at tey brunateknisku krøvini verða uppfylt.

**Tilmæli**
Vísandi til omanfyristandandi ískoyti, og

at tað í sambandi við byggiloyvið til bilhúsið longu er givið stórt frávik
at tað ikki er bygt sambært upprunaliga byggiloyvinum
at tað er bygt ólógliga afturat tí sum byggiloyvið varð givið til
at talan er sum enn størri frávik um umsøknin verður gingin á møti
at siðvenja ikki er hjá byggimyndugleikanum at geva so nógv og so stór frávik,
at talan er um ein tilbygning - og ikki eitt hálvtak - í mark,
og til almennu byggisamtyktina fyri A1 3. grundumráði, Kap. 4. § 26 stk. 6: *Í 3. grundumráði skulu allar byggingar standa fyri seg t.e. í minsta lagi 2,5 m frá markinum. Undantikin eru bilskúrar, bilskýli, skúr og smá úthús við ongum eldstaði.*

mæla tekniski stjórin og býararkitekturin til ikki at ganga umsóknini á møti. Samstundis verður mælt til, at heita á Landsrættin um at taka støðu til krav kommununar um at taka tað ólógligt bygda niður.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. mai 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Jan Christiansen hevur biðið um at fáa málið á skrá aftur.

Maria Hammer Olsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2011:** Vísandi til at onki nýtt er í málinum, halda Bogi Andreasen og Jógvan Arge fast við støðu teirra á fundinum 2. mai 2011.

Ein minniluti: Jan Christiansen mælir til at ganga umsóknini á møti sum frávik, treytað av at tey brunateknisku krøvini verða uppfylgt og krevur málið fyri býráðið.

Ein annar minniluti: Elin Lindenskov tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**125/11** **2011-0662**

## Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2011

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 24. mars 2011:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 14. apríl 2011**: Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri mars 2011 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:**Trivnaðarstjórin greiddi frá útvaldum konto. Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt.

Roknskapurin fyri apríl 2011 verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**126/11** **2011-1092**

## Fíggjarlig viðurskifti hjá plan- og rakstrardeildini fyri árið 2010 og 2011

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Plan- og rakstrardeildin umsitur fylgjandi deildir:

- §4: 4144 Skúlabarnaflutningur,
- §6: 6810 Kloakkir o.a.

6811 Áír, yvirflatuvatn og veitir
8110 Vegir o.a.
8111 Reinhald,
8112 Asfalt
8113 Ferðsla
8114 Kavarudding.

- §7: 7510 Bussleiðin
7610 Parkeringsskipanin.

Samlaða játtanin í 2010 var álj. kr. 58.735.000 og í ár kr. 56.445.000.

Einans tvær deildir høvdu eitt undirskot í 2010, størri enn ásettu 5% sambært galdandi játtanarreglum. Hesar eru:

- §6: 8114 Kavarudding, sum fekk flutt í 2010 kr. 1.200.000 frá deild 8112 Asfalt og gav hóast tað, eitt hall í fjør. Sí j. nr.: 2011-1092/2, ið vísir status fyri 2010.
- §7: 7610 Parkeringsskipanin, ið gav eitt hall. Víst verður í hesum sambandi til mál nr. 2011-2770, sum hevur verið viðgjørt í teknisku nevnd.

Av tí at ein nýggj kontoskipan bleiv innførd í 2010 er býtið av §6 deildunum ikki heilt, sum hon skal verða. Tað hevur ført við sær m.a. at neyðugt hevur verið at flyta upphæddir millum deildir. Sí j. nr.: 2011-1092/2.

Í sambandi við at kommunan hevur gjørt sáttmála um nýggja bussleið, er játtanin hjá deild 4144 Skúlabarnaflutningur fyri tað mesta førd yvir á deild 7510 Bussleiðin, av tí at tann nýggja bussleiðin kemur at røkja ein stóran part av skúlabarnaflutninginum. Millum annað tí eru hesar játtanir so nógv broyttar, at tað ikki gevur meining at samanbera tær við undanfarin ár.

**Viðv. §6 deildum:**
Samlaða játtanin til §6 rakstrardeildirna sum nevnt omanfyri er í 2011 kr. 1.090.000 minni enn í 2010.(víst verður til notat j. nr. 2011-1092/4)

Smb. fíggjardeildini verða øll úrslit frá 2010 framflutt til 2011. Tað vil viðføra, at §6 rakstrarjáttanirnar fyri 2011 verða á leið tær somu sum í fjør – tó við einum undantaki: deild 8114 Kavaruddingin, ið kemur at geva eitt hall annað ár á rað, vegna óvanliga nógvan kava.

**Viðv. §7 deildum:**
7610 Parkeringsskipanin hevur eitt stórt hall, av tí at tað var væntað eitt stórt yvirskot, ið ikki kom í 2010 og væntandi heldur ikki í 2011.

Verður tikið samanum fyri omanfyri standandi deildum innan §6 og §7 má staðfestast, at samlaði fíggjartørvurin fyri vantandi inntøkur á parkeringsskipanini, deild 7610 og ov stórum útreiðslum til kavarudding, deild 8114, fyri fíggjarárið 2010 og 2011, verður 2,5 mió. kr. (1,2 + 1,3 mió. kr.)

**Tilmæli:**
Við støði í avgerðini hjá fíggjarnevndini í sambandi við mál nr. 2011-2770 um parkeringsskipanina, har avgjørt varð í fíggjarnevndini, at umsitingin finnur írestandi játtan av øðrum rakstrardeildum innan tekniska økið, verður mælt til at taka undir við framlagda uppskotinum, j. nr 2011-1092 /3.

**Tekniska nevnd 28. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum at hækka játtanir á deild 6810 við kr. 100.000, deild 8111 við kr. 900.000, deild 8114 við kr. 1.300.000 og deild 7610 við kr. 1.200.000; og at lækka deild 6811 við kr. 900.000, deild 8110 við kr. 400.000 og deild 8112 við kr. 1.300.000.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tiilmælinum og at hækka játtanir á deild 6810 við kr. 100.000, deild 8111 við kr. 900.000, deild 8114 við kr. 1.300.000 og deild 7610 við kr. 1.200.000; og at lækka deild 6811 við kr. 900.000, deild 8110 við kr. 400.000 og deild 8112 við kr. 1.300.000 og deild 8113 við kr. 900.000.

**Býráðið 26. mai 2011:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**127/11** **<u>2001-2315</u>**

**<u>Leigusáttmáli Føroya Sílaveiðifelag, matr.nr. 1160a, 130m²</u>**

**Lýsing av málinum:**
Føroya Sílaveiðifelag hevur í nógv ár brúkt økið.

Felagið hevur bygt eini hús á økinum, við síðina av Reinsiverkinum, beint undir byrgingini.

Felagið hevur eina smoltstøð, sum fær vatn úr vatnbrunninum í Havnadali.

Sáttmáli er ongantíð gjørdur uppá undirlendið.

Løgdeildin hevur ringt til Hans Joensen og boðað honum frá, at sáttmáli má gerast.

Mynd av økinum 2001-2315/5.

Leigusáttmáli 2001-2315/4.

**Tilmæli:**
Fíggjarnevndin verður biðin um, at leggja málið fyri viðkomandi faknevnd/ir.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at beina málið til heilsu- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. mars. 2011:** Nevndin samtykti at viðmæla uppskotinum til leigusáttamála.

**Ískoyti:**
Sílaveiðifelagið hevur sent umsókn um byggiloyvi til at umvæla og útbyggja hølini hjá felagnum í Havnadali, j. nr. 2011-0324. Tryggjast skal at støddin á leigaða lendinum, ið sáttmálin umfatar, samsvarar núverandi tørvinum og møguligari útbygging.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til at sáttmáli verður gjørdur, har treytað verður at verandi og møguliga komandi økt virksemi lýkur galdandi umhvørvisásetingar, fyri t.d. útlát og handfaran av fóðri, so hetta ikki elvir til nøring av rottu og øðrum skaðadjórum. Tilmælið er eisini treytað av at virksemið lýkur krøv frá øðrum avvarðandi myndugleikum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 15. mars 2011**: Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin samtykti 16. februar 2011 at beina málið í teknisku nevnd. Umsitingin (plan-og rakstrardeildin) hevur ongar viðmerkingar til umsóknina hjá Sílaveiðifelagnum.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið til fundin í heilsu- og umhvørvisnevndini 15. mars 2011.

**Tekniska nevnd 7. juni 2011:** Nevndin samtykti at viðmæla uppskotinum til leigusáttamála.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**128/11** **<u>2005-2458</u>**

**Endurgjaldskrøv ísv. at byggitíðin viðv. Kollafjarðar skúla gjørdist longri enn ætlað**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Í sambandið við, at byggingin av Kollafjarðar skúla gjørdist munandi seinkað, hevur Tórshavnar kommuna móttikið endurgjaldskrav frá Map arkitektum fyri tap vegna longda byggitíð.
Kommunan gjørdi av og gav Map arkitektum boð um, at kommunan fór at bíða við at viðgera endurgjaldskravið, til málið hevði verið í gerrarrættinum.

Niðurstøðan hjá gerðarrættinum, journal nr. (2005-2180), er at Byggitek skal rinda býráðnum 1.085.000 kr. við procesrentu frá 13. november 2006 umframt sakarkostnað við kr. 253.000 soleiðis at samlaða upphæddin liggur tætt uppat støddini á teirri ábyrgd, sum er stillað í málinum.

Samanlagt fær býráðið viðhald í øllum krøvunum móti Byggitek, tó eru einkultir postar niðursettir. Samlaða kravið hjá Býráðnum verður góðkent við kr. 3.285.200 herundir fær Býráðið fult viðhald í kravi sínum um fullar dagbøtur uppá kr. 1.596.246.

Umsitingin hevur nú viðgjørt málið um endurgjaldskravið frá MAP arkitektum, og er niðurstøðan hendan:

| | |
|---|---|
| Upprunaliga uppgjørt krav (gjørt galdandi í gerðarrættar-málinum ml. TK og Byggitek) fyri eykaarbeiðir í byggi-tíðarskeiðinum, t.v.s. frá upprunaligu arbeiðsbyrjan til endaliga avhending. | 1.898.050,00 |
| Kravið reduserað við kr. 382.250,- orsaka av, at bert eykaarbeiðir frá 1/8-2005 fram til endaliga avhending eru tikin við. | 1.515.800,00 |
| Kravi reduserað við kr. 259.050,- orsaka av, at allir tímar fyri "projektuppfylging" eru drignir frá. | 1.256.750,00 |
| Kravið reduserað við kr. 257.950,- sum kompensa-tión/endurgjald til TK fyri krøv vegna manglandi kvalitetssikring umframt møgulig onnur krøv. | 998.800,00 |

Upprunaliga kravið frá MAP á kr. 1.898.050,- kundi TK ikki góðtaka orsaka av, at talan var um krav fyri øll eykaarbeiðir í allari byggitíðini. Her gjørdi TK galdandi, at eykaarbeiðir hjá MAP í upprunaligu sáttmálatíðini (tvs. fram til upprunaligu ætlaðu avhendingina til skúlabyrjan 2005) mátti MAP sjálvir bera.

Hetta góðtók MAP og kom við einari nýggjari uppgerð, har bert arbeiðir gjørd eftir 1. august 2005 vóru tikin við. Hendan uppgerð var áljóðandi kr. 1.515.800,-.

Hesa uppgerð vildi TK ikki heldur ikki góðtaka, tí í henni vóru eisini fleiri tímar fyri "prosjektuppfylging", sum eftir kommununnar tykki vóru arbeiðir, sum vóru partur av upprunaligu kontraktini og harvið var longu goldið fyri hesi.

Hetta góðtók MAP og kom við enn einari nýggjari uppgerð, har bert arbeiðir gjørd eftir 1. august 2005 vóru tikin við, umframt at alt arbeiði viðvíkjandi "prosjektuppfylging" var trekt frá. Hendan uppgerð var áljóðandi kr. 1.256.750,-. Eftir gjøgnumgongd av málinum innanhýsis í TK (Mikael H. Viderø, býararkitektur, Unnie Justinussen, arkitektur og Jóhan E. Simonsen, løgfrøðingur) er niðurstøðan, at hetta kravið frá MAP sum útgangsstøðið er reelt, og avspeglar tað eykaarbeiðið, sum veruliga er farið fram.

Frá hesari upphædd (kr. 1.256.750,-) hava samráðingar verið millum TK og MAP, har TK hevur gjørt galdandi, at TK hevur rætt til kompensatión/endurgjald fyri manglandi kvalitetssikring umframt møguligar aðrar útreiðslur, sum eru ein avleiðing av manglandi kvalitetssikringini. Júst hvussu stóra upphædd TK hevur krav uppá er ilt at siga, og nakað objektivt rætt tal ber neyvan til at koma til.

Báðir partar hava tí verið sinnaðir at finna eina samráðingarloysn, og hava hitst fleiri ferðir fyri at koma á mál. Samráðingarnar hava ført til, at MAP eru sinnaðir at góðtaka at fáa kr. 998.800,- (umframt mvg) til fulla og endaliga avgerð av málinum. . Afturat hesari upphædd skulu leggjast kr. 21.110,- (umframt mvg) fyri útlegg til koyring.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og leiðarin á løgdeildini mæla til at góðtaka at gjalda MAP-arkitektum kr. 1.083.654,- v/mvg til fulla og endaliga avgerð av millumverandi partanna millum.

**Mentamálanevndin 21. juni 2010:** Samtykt at taka av tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Samtykt at heita á byggideildina um at gera eina endaliga uppgerð av allari byggingini. Málið verður beint aftur í mentamálanevndina við atliti til at finna fígging.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Útsett.

**Ískoyti**
Endalig uppgerð fyri alla byggingina verður ikki tøk enn, tí tað er tengt at øðrum sakarmáli sum í løtuni verður ført móti Dansk Kaution, sum sýtir fyri at gjalda út alla ta upprunaligu stillaðu trygdarupphæddina. Mett verður tó, at hetta eigur ikki at forða kommununi at útinna semjuna við MAP og rinda tær kr. 1.083.654, skal ikki eitt formlig rættarkrav verða gjørt galdandi. Kommunan hevur í øðrum endurgjaldsmálið um Kollafjarðar skúla goldið rokningarnar av projektinum (2005-2458/26 SG – Reno Vent og LM Electric) sambært tilráðing frá

Løgdeildini. Viðmerkjast skal, at møguleikarnir fyri at gera semju við Dansk Kaution eru umrøddir av advokati kommununar, og verður hetta kannað nærri.

Sambært fyribils íløguætlanini fyri 2011 verður fígging játtað til endaligu projektuppgerðina fyri Kollafjarðar skúla.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at gjalda endurgjalds-semjuna kr. 1.083.654 av projektinum, og at samlaða hallið fyri verkætlanina verður fíggjað av játtan til íløgur fyri 2011.

**Mentamálanevndin 29. september 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 6. oktober 2010:** Mælt verður býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og gjalda kr. 1.083.654,00 av projektinum, og at samlaða hallið fyri verkætlanina verður fíggjað av játtan til íløgur fyri 2011.

**Býráðið fyri læstum hurðum 21. oktober 2010:** Kunnað varð um málið, sum verður viðgjørt á opnum fundi.

**Býráðið 21. oktober 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Í juni 2010 samtykti fíggjarnevndin, at heita á byggideildina um at gera endaliga uppgerð av allari byggingini í Kollafjarðar skúla. Allar uppgerðir í sambandi við um- og nýbyggingina í Kollafjarðar skúla eru nú avgreiddar, og roknskapurin vísir eina meirnýtslu á 3.138.000 kr.

Á íløguætlanini fyri 2011 á konto 4175, dagføring av skúlum, eru 3.000.000 kr. settar av til restfíggingina av byggiverkætlanini. Umframt at játta upphæddina á 3.000.000 kr. verður biðið um, at tær 138.000 kr., sum byggingin hevur kostað meir enn sett er av, verða játtaðar av konto 4175, dagføring av skúlum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 3.138.000 kr. av konto 4175, dagføring av skúlum, til restfíggingina av byggiverkætlanini fyri Kollafjarðar skúla.

**Mentamálanevndin 3. juni 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta játta 3.138.000 kr. av konto 4175, dagføring av skúlum, til restfíggingina av byggiverkætlanini fyri Kollafjarðar skúla..

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**129/11** **2009-0525**

**Annfinn Brekkstein: Fráboðan um vegskráningin á matr. nr. 23l, Velbastað er so illa frágingin, at tað ríður undan vegnum oman á matr. nr. 23k, Velbastað**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Annfinn Brekkstein hevur vent sær til umsitingina og boðað frá, at arbeiðið kring vegin á Símunartrøð á Velbastað matr. nr. 23l, Velbastað, er ov illa frágingið. Fram við ognunum matr. nr 23i og 23k, Velbastað er stórur hæddarmunur millum vegin og túnið hjá matrikuleigarunum og hetta førir við sær, at tað ríðir undan vegnum. Annfiinn Brekkstein hevur spurt, vegna eigararnar, um kommunan kann luttaka í kostnaðinum at gera stuðlamúr fram við omanfyri nevndu ognum.

Sambært ikki undirskrivaðum avhendingarskjali, dagf. 19/10-2004, eru staðfestir manglar so sum bakkantur og asfaltering og eftirfylgjandi staðfest eitt afturhald álj. kr. 63.825,- (u/mvg).

Sambært projektinum, ið var gjørt av Una Patursson og táverandi Velbastaðar kommunu, framgongur ongastaðni, at stuðlamúrur skal gerast á markinum millum vegin og ognirnar nr. 6 og 8 á Símunartrøð.

Tekniska nevnd skal taka støðu til spurningin um kommunan vil luttaka í gerð av stuðlamúrinum. Nenvdin skal eisini taka støðu til um kommunan skal luttaka í kostnaðinum at gera vegin lidnan. Vegurin er kommunalur og hevur matr. Nr 23l

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eingin ítøkilig fíggjarlig uppgerð fyri umfangið av at gera vegin lidnan. Í sáttmálanum verður víst til ymsar veitingarpostar so sum kloakk og vatn, men tað fyriliggja eingir kloakk-, vatn- og gøtuljósplanir í málinum og tískil er trupult at meta um kostnaðin fyri liðuggerð av vegnum.

Tekniska nevnd skal taka støðu til spurningin um kommunan vil luttaka í gerð av stuðlamúrinum. Stuðlamúrurin var ikki við í upprunaliga priojektinum – har var staðsettur skrái.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at halda fast við upprunaprojektið og mæla frá at kommunan luttekur í kostnaðinum fyri stuðlamúrin.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Nevndin samtykti at heita teknisku umsitingini

at lýsa málið nærri, at leggja fyri teknisku nevnd aftur.

**Ískoyti:**
Umsitignin hevur, saman við ráðgeva, latið gera eina kostnaðarmeting fyri liðuggerð av íbúðarvegnum.
Saman við tilgongdini í sambandi við liðuggerðina av vegnum, hava eigararnir av matr. nr. 23n, Velbastað (mál nr. 2011-1101) vent sær til kommununa og sóknast eftir, hvørjar ætlanir eru í sambandi við liðuggerðina av vegnum. Víst verður á, at tað ikki fer at bera til at byggja sethúsini eftir verandi umstøðum. Hetta tí tey standa til at eiga langt út á verandi veg, og at stóri hæddarmunurin millum ætlaða planeraða lendið á teirra matrikli og verandi veg fer at føra við sær antin høgan betong garð ella stóran skráa.
Umsitingin hevur havt samskifti við eigararnar og komið er fram til eina hóskandi loysn fyri tey og kommununa.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Sambært metingini kemur liðuggerðin av vegnum at kosta uml. kr. 713.000,-. Víst verður á, at peningur ikki er settur av til arbeiðið í 2011.

Umsitingin hevur ætlanir um at halda ástaðarfund við verandi matrikuleigarar, fyri at umrøða spurningin um eina møguliga marknaumskipan við eigararnar av matr. nr. 23n, Velbastað, og annars um liðuggerðina av vegnum. Mett verður, at tað kann bera til, at gera eina avtalu um marknaumskipan, uttan at neyðugt er at fara undir ábøtur av vegnum í ár, tí einki er sett av til arbeiðið í 2011.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at arbeitt verður eftir teirri loysn, at uml. 28 fermetrar av verandi vendiplássi verða nýttir til skráa at kompensera fyri stóra hæddarmuninum og at kommunan afturfyri fær uml 24-28 fermetrar av eystara parti av matr. nr. 23n, Velbastað.

Mælt verður til at heimila umsitingini, at gjørd verður ein avtala millum partarnar soleiðis, at tá tekniski parturin av málinum er liðugur, verður matrikulmálið lagt fyri fíggjarnevndina til endaliga staðfesting av marknaumskipanini.

Mælt verður harumframt til at málið um fígging av verkætlanini verður tikið upp til raðfesting í sambandi við viðgerðina av ársfíggjarætlanini.

**Tekniska nevnd 7. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

130/11 **2011-1390**

**Staðseting av bussskýlum á Velbastað**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til staðseting av trimum bussskýlum á Velbastað. Talan er um staðseting av einum stórum buss-skýli við vegamótið Gerðisbreyt/undir Borgarahálsi, eitt við skúlan á verandi betong-platti norðuri á Heyggi og eitt við Sólarmagn við gøtuna niðan á Stórheygg.

Málið verður beint um staðbundnu nevndina og teknisku nevnd til staðfestingar, áðrenn farið verður undir møguligar samráðingar um at útvega lendi.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 30. mai 2011:** Nýggj staðseting er vald.

**Tekniska nevnd 7. juni 2011:** Nevndin samtykti at heita á býráðið um fíggjarnevndina at útvega lendi sambært kortskjali j.nr. 2011-1390/2.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

131/11 **2010-0349 (sí j. nr 2011-1424)**

**Kloakk: Vestara bryggja - Álaker**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Ì sambandi við ” Reinsan av vestaru vág ” vantar nú at kloakkin frá fiskavirkinum verður førd út á opnan sjógv. Ì hesum sambandi hevur Tórshavnar havn latið gjørt eina kanning av viðurskiftunum á økinum á vestaru bryggju.

Saman við arbeiðinum á havnaøkinum, sum Tórshavnar havn stendur fyri, kundi hetta kloakkarbeiðið, ið fevnir um leggjan av kloakkleiðing út á streymasjógv frá Álakeri, verið gjørt í samstarvi við Tórshavnar havn.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Biðið verður um kr. 300.000,00 til projektering og kanningararbeiði og at P/F Martin E. Leo hevur projekteringina um hendi. Teir hava gjørt kanningina fyri Tórshavnar havn.

Kanningararbeiðið skal útgreina kostnaðarmeting av teknisku loysnina at leggja eina høvuðskloakkleiðing út frá fyrrverandi roykivirkinum út á streymasjógv. Harumframt skal ein møgulig umlegging av verandi høvuðskloakkleiðing, ið liggur fram við nýggja hospitalsbygningin hjá Landssjúkrahúsinum.

Umsitingin kunnar um kloakkætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at farið verður undir arbeiðið, og at hetta verður fíggjað av íløgum fyri kloakkir í 2010.

**Tekniska nevnd 4. mars 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 10. mars 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 300.000,- av undirkonto 6875, íløgur í kloakkir.

**Býráðið 18. mars 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyt:**
Projekt er komið frá Martin E. Leo, og er hetta gjørt í samstarvi við plan- og rakstrardeildina og Tórshavnar havn, sum í felag standa fyri útbjóðingini.

Umsitingin leggur fram uppskotið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna framlagda uppskotið og at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Parturin hjá Tórshavnar havn.**
Arbeiðið hevur verið boðið út saman arbeiðinum hjá Tórshavnar kommunu.

Licitatiónin varð hildin 19. mai 2011:
Inn komu 3 tilboð.

| | |
|---|---|
| P/F Hansen og Jacobsen | 1.426.034 |
| Maskingrevstur v/Frank Hellisdal | 1.718.013 |
| Sp/f Plan v/Jóhannis Hellisdal | 1.979.760 |

Kostnaðurin fyri projektering, eftirlit, trygging, príshækkingar, byggiánaraveiting og óvæntað er mettur til kr. 400.000,-.

Í tilmælinum frá Martin E. Leo verður mælt til at taka av lægsta tilboðnum frá P/F Hansen og Jakobsen upp á kr. 1.426.034,-.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum frá P/F Hansen og Jakobsen upp á kr.1.426.034,-
At avseta kr. 400.000,- til projektering, eftirlit, trygging, príshækkingar, byggiánaraveiting og óvæntað.
At játta kr.1.826.034,- av íløguætlanini fyri Tórshavnar havn 2011 til endaliga liðugtgerð av arbeiðinum.

**Havnarnevndin 24. mai 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
**Parturin hjá teknisku deild.**
Endaligt projekt er gjørt hjá Martin E. Leo, og varð lisitatión hildin á skrivstovuni hjá Martin E. Leo 19. mai 2011, kl. 11.00, og vórðu úrslitini hesi, sí skjal nr. 2010-0349/6.

Tilboðini eru kannað, og verður mælt til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá P/f Hansen & Jacobsen álj. 3.572.629,- (umvg).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá P/f Hansen & Jacobsen álj. 3.572.692,- og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 7. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini og teknisku nevnd.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**132/11** **<u>2010-2930 (sí j.nr. 2011-1430 og 2010-1718)</u>**

**<u>Kloakk frá Frítíðarskúlanun og Hestafjósunum í Havnadali</u>**

**Lýsing av málinum, samandráttur:**
Sambært samtykt í fíggjarnevndini 9. september 2010, j.nr. 2010-1718, hevur umsitingin latið gera uppskot til heildarloysn fyri frárensl frá bygningum á økinum.

Víst verður til kunngerð nr. 90 frá 28 sept. 2007, kap. 7 § 19, ið ásetir at: „ ´Einki, ið kann dálka vatnið, má verða leitt í áir, løkir, vøtn, strond ella føroyskt sjóøki ella goymast so nær teimum, at vandi er fyri at tað kann skolast út í tey. "

Ì hesum sambandi hevur Umhvørvisstovan boðað frá, at í seinasta lagi 1. januar 2015 skulu allar kloakkskipanir hjá kommununum lúka hesar ásettu treytir.

Staðfest er, at økið í Havnadali ikki lýkur hesar treytir. Har ein frítíðarskúli, hestafjós v.m. lata sínar kloakkir renna út í Tvørá. Hetta má fáast í rættlag og verður biðið um kr. 250.000 til uppmátingar og projektering av hesum arbeiði.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin av plan- og rakstrardeildini mæla til at beina málið í mentamálanevndina til útvegan av fígging til projektering.

**Tekniska nevnd 10. februar 2011:** Nevndin samtykti at beina málið í fíggjarnevndina at útvega fígging.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at beina málið aftur í tekniska nevnd við atliti til at ávísa fígging til arbeiðið.

**Ískoyti:**
Tekniska umsitingin hevur ikki sett pening av til planlegging av projektering av kloakk arbeiðum innan játtaðum fíggjarkarmum. Sambært umhvørvisslógini er tað álagt kommununi at gera neyðug atlit fyri ikki at dálka umhvørvið.

Sambært uppriti frá løgdeildini um spurningin viðv. kloakering við atliti frá ólógligari bygging, verður m.a. vís á, at:

*Endamálið við umhvørvislógini (og kunngerðunum, ið eru heimilaðar í umhvørvislógini) er at tryggja, at spillivatn verður burturleitt á ein skipaðan hátt og at fyribyrgja umhvørvisdálking og heilsuvanda. Eftir, at kommunan hevur gjørt eina heildarætlan, sum er góðkend av landsstýrismanninum, kann kommunan venda sær til ymisku húsaeigarararnar og heita á tey, um at fylgja ásetingunum í kloakætlanini, við tilvísing til heimildina §§ 14 og 21. Stk. 2, í kunngerð um umhvørvisreglur, eru soljóðandi:*
***§ 21.*** *[2] (Sett úr gildi).*
*Stk. 2. Hevur bý- ella bygda(r)ráðið lagt ella fer tað at leggja spillvatnsleiðing, hava eigarar av lendi, sum liggur nærindis, fyri egna rokning skyldu til at leiða egið spillvatn til felags spillvatnsleiðingina, og kann bý- ella bygda(r)ráðið áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi.*
***§ 14. Spillvatn.*** *Grundeigari hevur skyldu til at bera so í bandi, at spillvatn ikki setur inn á annan mans grund. Um so er, skal hann fyri egna rokning bøta um amparnar, og kann bý- ella bygda(r)ráðið áseta nærri reglur hesum viðvíkjandi Sambært § 2, stk. 1 nr. 3 í kunngerð um spillivatn er spillivatn allýst sum : vatn, sum á einhvønn hátt er dálkað, og sum ikki kann roknast sum regnvatn.*

*Umhvørvislógin tekur ikki hædd fyri hvørja bygging talan er um – t.v.s. hvørt tað er lógligt ella ólóglig bygging. Útgangspunktið er, at har spillivant verður útleitt, skal tað leiðast burtur á skipaðan hátt.*
*Í mun til ásetingarnar í § 8 "Kunngerð nr. 111 frá 7. September 2009 um spillivatn", ið er soljóðandi:*
*§ 2 Kunngerðin fevnir um kommnunalu ábyrgdina at burturleiða spillivatn frá húsarhaldum, virkjum, festum økjum o.ø. sambært góðkendari spillivatnsætlan"*
*og § 18 " Løgtingslóg um umhvørvisvernd", ið er soljóðandi:*
*§ **18.** Kommunan skal gera eina heildarætlan um, hvussu spillvatnið í kommununi skal fáast burtur.*
*er greitt, at kommunan er myndugleikin, ið skal gera eina heildarætlan um, hvussu spillivatnið í kommununi skal fáast burtur.*

Verður hugt nærri at tí virksemi, ið er úti á økinum kring fjósini í Havnardali, er talan um virksemi, sum ikki hevur verið viðgjørt í teknisku nevnd ella heilsu- og umhvørvisnevndini – við atliti til vegaatkomu og umhvørvið. Hetta virksemið er sett í verk, uttan tað á nøktandi hátt eru tikin neyðug atlit til tey teknisku og umhvørvisligu viðurskiftini. Her er tíverri ikki gjørdur nakar vegur við hartilhoyrandi veitingum sum vatn og ljós, og heldur ikki er nøkur skipað góðkend kloakkleiðing gjørd.

Skal tekniska nevndin hava ábyrgd av at fáa rættað upp á verkætlanir, ið eru settar í gongd av øðrum nevndum, má tekniska nevndin fáa tær neyðugu játtanir til júst hetta endamálið. Skal fígging hinvegin fáast til vega innan ásettu fíggjarkarmum hjá teknisku nevnd, eru útlit fyri at onnur arbeiði, ið nevdin umsitir, eftirfylgjandi mugu bíða ella útsetast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin ávísir fígging til projektering og kostnaðarmeting, upp til kr. 250.000, av íløgujáttanini til kloakkir í 2011, og at arbeiðið verður raðfest á íløguætlanini fyri 2011 og møgulig restfígging av íløguætlanini fyri 2012. Somuleiðis verður mælt til at boða eigarum og leigarum í økinum frá, at tey hava skyldu at halda krøvini sambært umhvørvislógini, og at binda í kloakkina tá hon er gjørd, og at rinda íbindingargjald í hesum sambandinum.

**Tekniska nevnd 10. mars 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina. Málið verður beint í heilsu- og umhvørvisnevndina til kunningar.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og mæla býráðnum til at játta kr. 250.000 kr. av íløgujáttanini til kloakkir í 2011 til projektering og kostnaðarmeting.

**Býráðið 24. mars 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Endaligt projekt er gjørt av P/f Pb Consult og var boðið út í innbodnari lisitatión, sum var hildin á skrivstovuni hjá Pb Consult tann 3. juni, kl. 14.00.
Úrslitini vóru hesi, sí skjal nr. 2010-2930/11.

Tilboðini eru kannað og mælt verður til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá Maskingrevstur P/f v/Frank Hellisdal

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at tikið verður við lægsta tilboðnum frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, alternativ II, áljóðandi kr. 706.930,- og í øðrum lagi alternativ I, álj. 1.100.680.- og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 7. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilboðnum frá Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, alternativ II, áljóðandi kr. 706.930,- og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Útsett.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Samtykt at beina málið aftur í teknisku nevnd at ávísa restfígging.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**133/11** **<u>2008-4491</u>**

**<u>Øki til eina nýggja hondbóltshøll til hondbóltsfelagið Neistan</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umboð fyri Neistan møta á fundinum.

Málið er ikki viðgjørt í umsitingini.

**Mentamálanevndin 12. apríl 2002:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn frá hondbóltsfelagnum Neistanum, har søkt verður um at sleppa at fáa økið at byggja eina hondbóltshøll á.

Felagið vísir á økið í Marknagili, - matr. nr. 917, ið er ogn hjá TK og liggur, sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, í umráðispartinum D2.

Hjálagt er:
Umsókn frá umsøkjaranum: j. nr. 2002-1012
Kortskjal av økinum: j. nr. 2002-1012

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Umsitingin hevur havt samráðingar við Neistan í sambandi við at teir upprunaliga søktu um at sleppa at byggja høllina á Frælsinum.

Hesum noktaði umsitingin fyri og vísti tá á, at umsitingin arbeiddi við einari ætlan úti í Marknagili, sum teir kundu gerast partur av.

Ætlanin bleiv síðani slept, og hevur umsøkjarin so vent sær aftur til TK við umsókn um at fáa ávíst eitt annað øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at lata Neistanum økið, matr. nr. 917, at byggja eina hondbóltshøll á.

Samstundis verður mælt til, at álagt verður Neistanum at skipa soleiðis fyri, at høllin møguliga kann útbyggjast til eina dupulthøll.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2003:** Samtykt at taka undir við ætlanini at lata Neistan byggja eina hondbóltshøll á part av matr. nr. 917, og at restina av økinum verður avlagt til eina møguliga høll aftur at.

Eisini samtykt at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. oktober 2003:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**<u>2002-1012</u>**

**<u>Umsókn um byggiloyvi til ítróttarhøll á matr. nr. 917, við Landavegin í Tórshavn.</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Hondbóltsfelagið Neistin søkir um byggiloyvi til ítróttarhøll á matr. nr. 917 við Landavegin í Tórshavn.
Útgangsstøðið fyri høllina er at gera eina høll, sum í støðd tekur støði í støddini á einum hondbóltsvølli, sum lýkur altjóða krøv til innandura hondbóltsvallir viðv. hædd, vídd og umstøðum til leikarar dómarar og áskoðarar.

Góðar umstøður verða til tey rørslutarnaði.

Bygningurin kann býtast upp í sjálvan hallarbygningi, og ein síðubygning, sum partvís er í tveimum hæddum. Samlaða víddin á bygninginum verður 2.945,4m².

Tað verða pláss fyri í alt 910 áskoðarum, harav tey 680 verða sitipláss.

Útveggir og tekjan verða klædd við profileraðum aluminiumsplátum. Vindeygu og úthurðar verða úr aluminium.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðisparti D2 ítróttarøki, og er umsóknin viðgjørd eftir almennu byggisamtyktini.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Grundøkið, matr. nr. 917, er 16.843 m² til víddar.
Byggistigið verður 0.17. Mest loyvda byggistig er 0.25.
Nettonýtslustigið verður 0.24. Mest loyda nettonýtslustig er 0.3.
Tal av bilstøðlum fult útbygt 273. Kravt tal av bilstøðlum 4117,4 / 50 = 82.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Fíggjarnevndin hevur samtykt á fundi 15. mars 2006 at játta kr. 7.250.000,- yvir 5 ár.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j.nr. 2002-1012.
Støðumynd í mát 1:1000.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini at ganga umsóknini á møti, at senda málið til grannakunningar, og at útskriva byggiloyvi, tá aðrir myndugleikar, ið hava heimild at seta krøv, hava góðkent bygningina. Samstundis at beina málið í teknisku nevnd, í sambandi við ætlaða vegin fram við vestara markinum, sum skal samanbinda Landavegin og Marknagilsvegin, umframt eitt møguligt busssteðgipláss í sambandi við høllina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006:** Nevndin samtykti at beina málið í fíggjarnevndina til avgreiðslu av lendisspurninginum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at leiga Neistanum hóskandi/neyðugt lendi av matr. nr. 917 til bygging av ítróttarhøll við neyðugum uttanum øki til parkering v.m. við somu treytum og leiguupphædd sum aðrir ítróttarbygningar.

Tilsøgnin um leigu er treytað av, at byggingin er byrjað innan 2 ár.

**Býráðið 21. september 2006**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at góðkenna uppskot til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008**: Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála.

**Býráðið 27. november 2008**: Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen..

**Ískoyti:**
Neistin ynskir at broyta sáttmálan so at tað verður Stuðlafelagið Neistin, sum kemur at standa sum leigari av grundøkinum, eigari av høllini og móttakari av stuðli. Harumframt ynskja teir at kravið í grein 3 í verandi sáttmála um grundøkið viðvíkjandi møguleikum fyri dupulthøll verður slept.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2010:** Samtykt at beina málið í mentamálanevndina og byggi- og býarskipanarnevndina til skjóta viðgerð.

**Ískoyti:**
Í skrivi, dagfest 21.01.2010, biður Hondbóltsfelagið Neistin um broyting í leigusáttmálanum. Neistin ynskir, at grein 3 verður broytt, soleiðis at tann parturin av greinini, ið snýr seg um møguleikan at byggja eina høll afturat á økinum móti høllini hjá Neistanum, verður strikaður. Hesin partur er soljóðandi:

"Byggingin hjá leigaranum skal verða í mark á útnyrðingssíðuni (niðaneftir), byggingin skal, hvat konstruktiónum viðvíkur verða gjørd soleiðis, at tað í framtíðini ber til at byggja eina høll afturat á ovara partinum av stykkinum í mark móti høllini hjá leigaranum, og soleiðis at opnast kann millum hesar báðar hallir og at tær kunnu sláast saman til eina stóra høll í samband við serlig tiltøk (t.d. multiarena, landsdystir 0.l.).

**Býráðið 28. januar 2010:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 10. februar 2010:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekniska- og trivnaðarumsitingin eru av kommunustjóranum biðin um at lýsa málið í einum uppriti til viðgerðina í mentamála- og byggi- og býraskipanarnevndini.

Biðið verður um, at gongdin í málinum verður lýst við grundarlagi í teimum samtyktum, ið eru gjørdar í politisku nevndunum, samskiftinum við Neistan, innlatnum tilfari og avtalum umframt grundgevingum og tankum aftanfyri tær treytir, sum býráðið setti í sambandi við góðkenning av leigusáttmálanum. Biðið

verður eisini um, at umsitingin á hesum grundarlagi ger eitt greitt tilmæli í málinum v.v ynskinum hjá Neistanum um at sleppa at broyta verkætlanina frá at byggja til dubulthøll.

Umsitingin hevur síðani gjørt upprit í hesum sambandi (j. nr. 2008-4491/16), har gongdin í málinum er lýst, umframt býarskipanarligu atlitini. Viðv. býarskipanarligu atlitunum kann leggjast afturat, at tekniska umsitingin metir, at nú nýggi bygningurin til skúladepilin í Marknagili er staðsettur og hevur fingið skap, styrkir hetta bert uppaftur meira uppundir, at øll bygging á ítróttarøkinum – matr. nr. 917 – inngongur í heildarskipanina av økinum, soleiðis sum upprunaliga ætlað. Umsitingin hevur í sambandi við skúladepilin havt fund við ráðgevar landsstýrisins um skipan av økinum, við støði í útkasti sum umsitingin hevur gjørt (j. nr. 2008-4491/17).

Gjøgnumgongdin í málinum vísir, at spurningurin um dupulthøll hevur verið viðgjørdur við Neistan líka síðani 2003, og at spurningurin somuleiðis hevur verið viðgjørdur politiskt. Og í samráðingunum uppundir at leigusáttmáli varð gjørdur fyri økið í 2008, var spurningurin eisini viðgjørdur bæði við Neistan og politiskt, tá fíggjarnevnd og býráð einmælt samtyktu leigutreytirnar. Gjøgnumgongdin vísir tó eisini, at tørvur helst eisini er á at fáa eina samlaða skipan av ymsu viðurskiftunum í málinum, herundir veðrætt kommununar fyri higartil játtaða stuðulinum, íbinding í veg og kommunalar leiðingar, eins og spurningin um býti av hallartímum í øðrum kommunalum hallum, tá Neistahøllin er liðug, soleiðis at eisini onnur feløg fáa gagn av, at ein høll afturat kemur í høvuðsstaðnum, soleiðis sum Neistin sjálvur legði upp til í upprunaliga umsøkn síni hin 11. apríl 2002 (j. nr. 2002-1012). Nógv av hesum viðurskiftum eru ikki partur av treytunum í leigusáttmálanum, tilsøgnini um stuðul, graviloyvi o.l.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, býararkitekturin og leiðarin á mentamáladeildini mæla frá at ganga umsøknini um at strika part av grein 3 í leigusáttmálanum, soleiðis sum søkt er um, men at umsøkjarin fær boð um at halda seg til treytirnar í leigusáttmálanum. Hetta vísandi til omanfyristandandi ískoyti og uppritinum um málsgongd, býarskipanarlig atlit v.m. (j. nr. 2008-4491/16), umframt at hetta vil oyðileggja seinasta møguleikan fyri eini stórhøll innanfyri ringvegin í høvuðsstaðnum. Økið er uml. 17.000 fermetrar til víddar, og tað vil verða at burturspillað økið og teir møguleikar sum økið gevur, at ganga umsøknini á møti. Og samstundis vil tað at ganga umsøknini á møti forða fyri, at onnur ítróttarfeløg ella kommunan kunnu fáa gagn av økinum. Tí verður mett sera umráðandi at planleggja langsiktað, við at hava møguleikan fyri at onnur ítróttarfeløg ella kommunan seinni kunnu byggja hina helvtina av høllini, og harvið fáa eina stórhøll í býnum.

Hinvegin verður tó víst á møguleikan, at taka spurningin um stuðul til byggingina hjá Neistanum upp til nýggja viðgerð, við støði í, at kommunan veitir ein nakað størri stuðul og samstundis leingir stuðulstíðarskeiðið, at dekka part av skjalprógvaðum eykaútreiðslum sum felagið fær av at venda berandi

konstruktiónini soleiðis, at uppíbygging er møgulig. Hetta kann samstundis verða treytað av, at tað samstundis verður gjørd ein ískoytisavtala til leigusáttmálan ella ein serstøk rakstraravtala, um nýtslu av høllini til slík serlig tiltøk, sum ein dupulthøllin gevur møguleika fyri.

Somuleiðis eigur høvi at verða nýtt til at tryggja kommununi veðrætt fyri higartil játtaða stuðulin, og at avtala verður gjørd við Neistan um býti av hallartímum í øðrum kommunalum hallum, tá Neistahøllin er liðug, soleiðis at eisini onnur feløg fáa gagn av, at ein høll afturat kemur í høvuðsstaðnum, soleiðis sum Neistin sjálvur legði upp til í upprunaliga umsøkn síni hin 11. apríl 2002 (j. nr. 2002-1012).

At enda verður mælt til, at Neistin fær ikki loyvi til at halda áfram við arbeiðinum tá planeringin er liðug, fyrr enn fullfíggjað prosjekt er latið kommununi at byggimálsviðgera.

Um Neistin ikki ynskir at ganga undir treytirnar sambært leigusáttmálanum, eigur leigusáttmálin at sigast úr gildi, og onnur staðseting at finnast til eina stakhøll, soleiðis sum Neistin ynskir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2010:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at gera eina avtalu við Neistan, sum verður at leggja fyri avvarðandi nevndir.

**Ískoyti**
Neistin hevur í skrivi dagf. 27. mai 2010 lagt fram aftur ynskið um at broyta leigusáttmálan soleiðis, at Tórshavnar kommuna gongur frá treytini í leigusáttmálanum um møguleikan fyri dupulthøll. Harumframt verður boðað frá, at høllin kemur at kosta kr. 25 mió, og at Stuðlafelagið Neistin letur kr. 10 mió. Tórshavnar kommuna hevur áður játtað kr. 7,25 mió í stuðli.

Felagið bjóðar nú kommununi ávís serrættindi í høllini mótvegis gjaldi í alt kr. 7,75 mió pluss rentur yvir 10 ár. Upphæddina tekur felagið í láni, har transportur verður gjørdur millum Tórshavnar kommunu og viðkomandi lánistovn.

Serrættindini fyri gjaldinum eru, at kommunan 10 ár fram hevur fyrsta rættin at leiga høllina hvønn gerandisdag frá klokkan átta á morgni til klokkan 14 seinnapart til fólkaskúlar, frítíðarskúlar, dagstovnar, ungdómshús o.líkn. hjá Tórshavnar kommunu. Haraftrat kann kommunan í samráð við Neistan fyriskipa rúsfríar konsertir o.líkn. í vikuskiftum. Dentur verður lagdur á, at tiltøkini ikki skulu fara illa við høllini.

**Ískoyti**
Neistin hevur í skrivi dagf. 27. mai 2010 lagt fram aftur ynskið um at broyta leigusáttmálan soleiðis, at Tórshavnar kommuna gongur frá treytini í

leigusáttmálanum um møguleikan fyri dupulthøll. Harumframt verður boðað frá, at høllin kemur at kosta kr. 25 mió, og at Stuðlafelagið Neistin letur kr. 10 mió. Tórshavnar kommuna hevur áður játtað kr. 7,25 mió í stuðli.

Felagið bjóðar nú kommununi ávís serrættindi í høllini mótvegis gjaldi í alt kr. 7,75 mió pluss rentur yvir 10 ár. Upphæddina tekur felagið í láni, har transportur verður gjørdur millum Tórshavnar kommunu og viðkomandi lánistovn.

Serrættindini fyri gjaldinum eru, at kommunan 10 ár fram hevur fyrsta rættin at leiga høllina hvønn gerandisdag frá klokkan átta á morgni til klokkan 14 seinnapart til fólkaskúlar, frítíðarskúlar, dagstovnar, ungdómshús o.líkn. hjá Tórshavnar kommunu. Haraftrat kann kommunan í samráð við Neistan fyriskipa rúsfríar konsertir o.líkn. í vikuskiftum. Dentur verður lagdur á, at tiltøkini ikki skulu fara illa við høllini.

Fíggingin
Verða kr. 7,75 mió lagdar aftrat áður játtaða stuðlinum, verður kommunali parturin av byggingini í alt kr. 15 mió, ella 60%. Áður játtaði stuðulin uppá kr. 7,25 mió er býttur yvir 5 ár, og eftir at gjalda er kr. 3.022.000 í 2011 og kr. 1.052.000 mió í 2012 av kontu 5370 Stuðul til íløgur.

Árliga gjaldið til meirfíggingina kr. 7,75 mió pluss 6% p.a. í rentu yvir 10 ár verður uml. kr. 1.050.000.

Fyri ta meirfígging, sum kommunan skal lata fyri ávísan nýtslurætt í høllini, er roknaða leigan yvir kr. 800 um tíman (6 tímar um dagin, 5 dagar um vikuna, 10 mðr um árið). Hetta er meira enn ferfalt leiguprísinum í kommunalu hallunum, og hóast at kommunan kann fáa gleði av nýtslurættinum til børn og ung – fyrst og fremst uttanfyri skipaðu ítróttafeløgini, so er hetta tó kostnaðarliga als ikki kommununi til fyrimunar.

Metast má vera sera óheppin gongd, um ítróttaverkløg, ið ítróttafeløg formliga standa sum byggiharrar og ánarar yvir, skulu hava 60% av byggikostnaðin játtaðan frá kommununi, harav 30% skulu eyðmerkjast sum nýtslugjald. Hetta er ikki í samsvari við siðvenjuna, at kommunan rindar 30% í stuðli. Tørva verkætlanir veruliga 60% í stuðli ella reellari fígging frá kommununi fyri at verða realiseraðar, so er rættari mannagongd, at kommunan sjálv stendur sum byggiharri og ánari, so at íløgan kann koma fleiri ítróttafeløgum til gagns.

Sum heild er talan um sera stóra og serstaka kommunala fígging til ítróttahøll hjá einstøkum felag, og sum onnur ítróttafeløg í útgangsstøðinum ikki fáa nakran ágóða av. Neistin hevur frammanundan 17,5 venjingartímar í Høllini á Hálsi. Kommunan eigur í minsta lagi at krevja hesar tímar frá Neistanum, so at kommunan fyri meirfíggingina til Neistan og ávísan nýtslurætt til nýggju høllina eisini kann skapa betri hallarumstøður til onnur ítróttafeløg í kommununi. Hetta eigur at verða avgjørt krav.

Skal kommunan binda seg til at játta og gjalda millióna brúksgjald komandi 10 árini, so eigur at verða gjørdur ein formligur sáttmáli hesum viðvíkjandi. Men uttan mun til hetta, er veruligi leigukostnaðurin so mikið høgur, at mælt verður frá hesi ætlan um meirfígging til byggingina.

Leigusáttmálin
Ynskið frá Neistanum um, at kommunan gongur frá kravinum um dupulthøll, krevur broyting í leigusáttmálanum. Sum omanfyri er lýst (málslýsingin til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 22. mars 2010), hevur staðsetingin av høllini beinleiðis samband við treytina um dupulthøll. Mælt varð tá frá broytingini, og hetta tilmælið stendur við.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla framvegis frá at broyta tann partin av leigusáttmálanum, sum fevnir um møguleikan fyri dupulthøll. Víst verður í hesum sambandi til útgreinaða tilmælið til áðurnevnda nevndarfundin 22. mars 2010.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla somuleiðis frá at játta kr. 7,75 mió pluss rentur yvir eitt 10 ára skeið aftrat teimum kr. 7,25 mió í stuðli, sum áður eru játtaðar til høllina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla framvegis frá at broyta tann partin av leigusáttmálanum, sum fevnir um møguleikan fyri dupulthøll. Víst verður í hesum sambandi til útgreinaða tilmælið til áðurnevnda nevndarfundin 22. mars 2010.

**Mentamálanevndin 21. juni 2010:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at broyta leigusáttmálan fyri lendið soleiðis, at Neistin kann byggja eina einstaka høll, og at byggingin skal verða staðsett soleiðis á økinum, at tilber at byggja verklag til ítróttarendamál á grannastykkinum (restini av matriklinum).

Nevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 7,75 mió í stuðli til høllina, at gjørdur verður leigusáttmáli um ókeypis nýtslurætt hjá kommununi í høllini, at lýst verður veð fyri meirjáttanini (7,75 mió kr.) í bygninginum í 25 ár, og at venjingartímarnir hjá Neistanum í kommunalu høllini á Hálsi koma øðrum ítróttarfeløgum til góðar.

Sambært ætlaða leigusáttmálanum um nýtslurætt skal kommunan í 10 ár fram eitt nú hava fyrsta rætt til at leiga høllina hvønn gerandisdag frá kl. 8 á morgni til kl. 14. Haraftrat kann kommunan í samráð við Neistan fyriskipa rúsfríar konsertir o.líkn. í vikuskiftum, handilsstevnur og onnur størri tiltøk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við mentalálanevndini, at broyta leigusáttmálan fyri lendið soleiðis, at Neistin kann byggja eina einstaka høll, og at byggingin skal verða staðsett soleiðis á

økinum, at tilber at byggja verklag til ítróttarendamál á grannastykkinum (restini av matriklinum).

Elin Lindenskov var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 24. juni 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini 21. juni 2010 og byggi- og býarskipanarnevndini 23. juni 2010.

Samtykt at mæla býráðnum til at játta 7,75 mió. kr. í stuðli, ið verður at útgjalda yvir 10 ár – í fyrsta lagi frá 2011. Stuðulin er treytaður av góðkenning frá landsstýrinum, smb. Roknskaparkunngerðini nr. 124. frá 22. desember 2000 um ábyrgdarbindingar, veðhald, v.m. sambært kommunustýrislógini.

Somuleiðis samtykt at mæla býráðnum til, at Tórshavnar kommuna fyri samlaðu stuðulsupphæddina á 15 mió. kr. fær veð í høllini fyri hesa upphædd.

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Neistin hevur í skrivi 6. september vent aftur við nýggjari umsókn. Í umsóknini vísir felagið á, at Neistin á fundi við Tórshavnar kommunu eisini hevði spurningin um rentur inni í mynduni, men at tær ikki vóru við, tá ið málið kom fyri á býráðsfundi.

Neistin vísir á, at fyribils kostnaðarætlanin, við Gundadalshøllini sum fyrimynd, vísir, at høllin kostar kr. 750.000 at reka um árið. Felagið metir, at tað verður torført at reka høllina við Landavegin, tá ið Stuðlafelagið Neistin samstundis má lána tríggjar milliónir, sum resta í tíggju milliónum í eginpeningi, og so eisini gjalda rentur av teimum 7,75 milliónum í 10 ár.

Neistin søkir tí Tórshavnar kommunu um at fáa stuðulin 7,75 mill. kr. goldnar yvir tvey roknskaparár, ávíkavist í 2011 og 2012.

Viðv. fyrispurninginum til Fíggjarmálaráðið um at rinda stuðulin út yvir fleiri ár, so fekk kommunan í fyrstu atløgu noktandi svar vísandi til, at tað er torført at vísa á langtíðar realbúskaparligir fyrimunir. Til dømis verður skuld aloftast rentað bíligari hjá kommunum enn hjá felagsskapum. Tórshavnar kommuna hevur svarað Fíggjarmálaráðnum skrivliga og víst á fyrimunir við at gjalda út yvir fleiri ár og havt fund við ráðið um málið. Fíggjarmálaráðið vísir nú á eina trý ára loysn – 2011-2013, men málið er ikki endaliga avgreitt.

Skal kommunan játta umbønini hjá Neistanum, er neyðugt við umraðfestingum á fíggjarætlanini fyri 2011 (og 2012) ella at kommunan tekur lán at fíggja høllina hjá Neistanum við. Á fíggjarætlanini fyri 2011 eru settar av 1.050.000 kr. í stuðli til Neistan.

Fíggjarætlanin fyri 2011 er løgd fram í býráðnum og eingin ætlan er um at hækka lánini hjá kommununi; tískil tykist tann møguleiki útilokaður. Ein 10 ára loysn er ein dýr loysn, har Neistin/kommunan rinda 2.750.000 kr. í rentum. Út frá einum fíggjarligum sjónarmiði loysir tað seg tí betur at rinda høllina í byggitíðini.

Skal kommunan fylgja hesum leisti, nú býráðið hevur játtað Neistanum 7.750.000 kr. afturat í stuðuli, er ein møguleiki at rinda upphæddina yvir 3 ár, fyrstu ferð 2011. Upphæddin verður tá kr. 2.600.000 kr. um árið í 3 ár, tvs 1.550.000 kr. afturat til Neistan á fíggjarætlanini fyri 2011 .

Ein annar møguleiki er at halda fast við verandi samtykt og lata Neistan útvega peningin á annan hátt vísandi til, at kommunan longu sum er, hevur játtað 15 mió. kr. til høllina umframt grundstykkið. Hetta er væl meira, enn hvat siðvenjan hevur verið at rinda í stuðuli at byggja hallir v.m. fyri.

**Fíggjarnevndin 6. oktober 2010:** Mælt verður býráðnum til at staðfesta áður gjørda samtykt frá 24. juni 2010 við teirri broyting, at stuðul áljóðandi 7,75 mió. kr. verður játtaður yvir trý ár – fyrstu ferð í 2011.

**Býráðið 21. oktober 2010:**

Heðin Mortensen legði fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

"*Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini tó við teirri broyting, at játtaður verður ein samanlagdur stuðul áljóðandi 60 prosent av byggikostnaðinum. Stuðulin verður roknaður av einari upphædd, ið ikki kann fara upp um 25 milliónir krónur.*"

Einmælt samtykt.

Formaðurin ynskir hetta málið á skrá:

**Ískoyti:**
Neistin hevur vent sær til býráðið viðvíkjandi samtyktini um nýtslurættin hjá kommununi til høllina. Felagið ger vart við, at samtyktin um ókeypis nýtslurætt yrkadagar kl. 08.00-14.00 samsvarar ikki við umsóknina, sum Neistin læt inn í 2010. Har varð lagt upp til, at kommunan fekk fyrsta rætt til at leiga høllina.

Neistin vísir á, at uttan leiguinntøkur ber ikki til at reka høllina, og tí kann felagið heldur ikki byggja høllina.

Tórshavnar býráð hevur við sínum samtyktum tikið undir við, at Neistin byggir eina ítróttarhøll í Vesturbýnum. Ásannast má, at tað ber ikki til at leggja slíkar treytir við stuðlinum frá kommununi, at felagið, sum fær stuðulin, ikki orkar at reka høllina, tá ið hon er bygd.

Tí verður mælt til at orða samtyktina um kommunurnar nýtslurætt til høllina við Landavegin á henda hátt:

"Kommunan hevur í 10 ár fyrsta rætt at leiga høllina hvønn yrkadag frá kl. 08.00 til 14.00. Í samráð við Neistan kann kommunan eisini í vikuskiftum skipa fyri rúsfríum konsertum o.líkn., stevnum og øðrum størri tiltøkum. Kommunan og Neistin áseta á hvørjum ári, hvønn tørv kommunan hevur á høllini."

**Mentamálanevndin 18. mai 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti á fundi 21. oktober 2010 at játta Neistanum 7,75 mió. kr. afturat í stuðli. Partur av samtyktini ásetur, at kommunan fær ein ókeypis nýtslurætt til høllina í tíðarskeiðnum 8-14 yrkadagar, umframt konsertir o.a. í vikuskiftinum. Sum lýst omanfyri ynskir Neistin at hesin ókeypis nýtslurættur verður strikaður, grundað á, at tað ber ikki til at reka høllina uttan leiguinntøkur.

Virðið á ókeypis nýtslurætti verður mett til kr. 270.000 um árið – roknað út frá tí, sum Neistin hevur upplýst.

At strika nýtslurættin til Neistahøllina, kann fáa avleiðingar fyri leistin, sum er brúktur fyri høllina hjá Dansifrøði. Har er eisini ásett regla um ókeypis nýtslurætt.

Í avtaluni við Dansifrøi er ásett, at Tórshavnar kommuna hevur rætt at nýta felagshølini hjá Dansifrøi ókeypis tveir leygardagar um mánaðin frá kl. 8.00 til kl. 7.00 dagin eftir. Verða leygardagarnir skiftir út við yrkadagar, verða tveir yrkadagar latnir í staðin fyri. Hetta tykist eitt sindur minni víðfevnandi enn hjá Neistanum.

Sum kommuna hava vit skyldu at viðgera feløgini eins. Avleiðingin av at strika treytirnar hjá Neistanum viðv. ókeypis nýtslurætti kann tískil viðføra, at kommunan eisini má strika ókeypis nýtslurættin íhøllini hjá Dansifrøi, um søkt verður um tað.

Tað fyriliggja ikki skjøl uppá, hvørt raksturin í Neistahøllini hongur saman ella ikki, tí er torført at meta um hetta. Felagið er biðið um at útvega rakstrarætlan fyri høllina.

At kommunan letur 60% í stuðli til eina høll, sum ikki ber seg rakstrarliga, hongur ikki saman.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla tí til, at kommanan saman við Neistanum finnir ein leist, har kommunan varðveitir ókeypis ein nýtslurætt, tó so, at nýtsluræPetturin í størri mun minnir um leistin hjá Dansifrøi, og tískil er minni víðfevnandi.

**Fíggjarnevndin 8. juni 2011:** Samtykt at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um eina endaliga loysn, sum verður at leggja fyri ein eyka fíggjarnevndarfund.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur samráðst við felagið. Loysnin er ein avtala um ókeypis nýtslurætt eftir mestsum sama leisti sum avtalan, ið kommunan hevur við Dansifrøi. Eftir hesum kemur kommunan at hava rætt til at nýta ítróttahøllina hjá Neistanum ókeypis tveir dagar um mánaðin – antin leygardag ella sunnudag, tó so, at atlit skal takast til heimadystir Neistans. Møguleiki er eisini at brúka fríggjadag, hóskar tað til venjingarnar hjá Neistanum, eins og møguligt er at nýta onkran yrkadag í staðin fyri vikuskiftisdagarnar.

Hvørt hálva ár verður ein skrá løgd fyri nýtsluna hjá kommununi fyri komandi hálva árið. Um kommunan skal nýta nýtslurættin ávísan dag, skal kommunan boða frá hesum í seinasta lagi 14 dagar frammanundan.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla býráðnum til um fíggjarnevndina at taka undir við omanfyristandandi uppskoti um broyttar nýtslutreytir í ítróttarhøllini hjá Neistanum.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum um avtalu um ókeypis nýtslurætt tveir dagar um mánaðin.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**134/11** **<u>2010-2007</u>**

**<u>Dagstovnurin í Hoyvik</u>**

Fyri eini tíð síðani varð staðfest, at Dagstovnurin í Hoyvik er fongdu av blámusoppi. Royndir vóru tiknar til tess at staðfesta vavið av blámusoppafongdu økjunum. Og út frá hesum varð gjørt útbjóðingartilfar til timburarbeiðið. Arbeiðið verður gjørt í stigum soleiðis, at ein lon verður gjørd í senn.

Samlaða kostnaðarmetingin ljóðaði tá uppá 6,4 mió. u. mvg, sum Húsaumsitingin eftir ætlan skuldi rinda av síni viðlíkahaldsjáttan fyri 2011 og 2010.

Nú veggir, gólv o.a. er niðurtikið kann staðfestast, at vavið av soppafongdu økjunum er munandi størri enn upprunaliga kanningarnar góvu ábending um. Tað er stórt sæð øll lonin, sum er soppafongd. Harumframt kann staðfestast, at fukt

treingir upp gjøgnum gólvið. Helst hevur hetta verið so líka síðani bygningurin varð bygdur. Og nógvu lekarnir og soppavøksturin hava eisini viðført, at partar av berandi takkonstruktiónini er rotin og má skiftast út.

Vavið av umvælingararbeiðinum er tí vaksið munandi. Sambært eini dagførdari kostnaðarmeting grundað á vavið av skaddu økjunum, sum staðfest eru í fyrstu lonini, væntast umvælingarkostnaðurin nú at liggja upp ímóti 12 mió. kr. u. mvg.

Tá er framvegis ikki heilt greitt, um tað harumframt verður neyðugt at leggja nýtt takpapp á allan bygningin, og somuleiðis eru trupulleikar við lekum kring yvirljósini, sum ikki eru loystir enn. Hesi ting eru ikki við í kostnaðarmetingini.

Húsaumsitingin hevur ikki fíggjarligar umstøður til at bera ein enn størri part enn tær kr. 6 mió, sum upprunaliga ætlað. Ein loysn er, at írestandi peningurin verður funnin við umraðfestingum á íløguætlanini.

Skal arbeiðið halda fram, er neyðugt at játta meirfígging skjótast.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2011:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið fyri læsum hurðum 14. apríl 2011:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 4. mai 2011:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Niðanfyri er yvirlit yvir íløgujáttanir, sum mett verður kunnu vera vit til at fíggja meirkostnaðin av umvælingararbeiðinum.

**Dagstovnur í Hoyvík - meirfíggingartørvur uml. 6 mió kr.**

| | Projektnr. | Upphædd |
|---|---|---|
| **§ 3 Børn og ung** | | |
| Løgukarmur (frítíðarskúli) | - | 1.000.000 |
| FTS í Gula skúla | L31002 | 242.000 |
| **§ 5 Mentan og frítíð** | | |
| Musikkskúlin | L51002 | 3.800.000 |
| Spælipláss í Grasagarði | L53001 | 150.000 |
| Íløgukarmur (badmintonhøllin) | - | 240.000 |
| Tórsvøllur | L57008 | 4.538.000 |
| Ítróttahøllin í Kollafirði | L57011 | 1.500.000 |
| **§ 6 Teknisk mál** | | |
| Íløgukarmur (fríðkan) | - | 331.000 |
| Kongabrúgvin | L62012 | 996.000 |
| Vaglið | L62014 | 997.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Frílendi til borgaran | L62015 | 217.000 |
| Løgukarmur (kirkjugarðar) | - | 1.000.000 |
| Løgukarmur | - | 396.000 |
| Keyp og søla | - | 1.500.000 |
| **§ 7 Kommunal virkir** | | |
| Útbúnaður á bátaøkinum | L74002 | 5.848.000 |
| | | |
| **Í alt** | | **22.755.000** |

**Mentamálanevndin 18. mai 2011:** Nevndin samtykti at biðja um gjølla frágreiðing um, hvussu tað ber til, at skaðin á húsið er so nógv kostnaðarmeiri enn mett varð í fyrstani.

Nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at játtaðar verða umleið 6 mió krónur aftrat til umvælingina av Dagstovninum í Hoyvík soleiðis:

| | |
|---|---|
| Løgukarmur (frítíðarskúli) | 1.000.000 |
| FTS í Gula skúla | 242.000 |
| Badmintonhøllin | 240.000 |
| Keyp og søla | 1.500.000 |
| Húsaumvæling | 2.500.000 |
| B&U økt virks (rakstur) | 500.000 |

**Fíggjarnevndin 24. mai 2011:** Deildarleiðarin í Húsaumsitingini greiddi frá málinum. Samtykt at mæla býráðnum til við eykajáttan at játta tkr. 12.000 av íløgum á konto 3175, barnaansing íløgur.

Íløgan verður fíggjað við niðanfyri standandi flytingum:

tkr.

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3175 | FTS, Løgukarmur | Lækking | -1.000 |
| 3175 | FTS, Guli skúli | Lækking | -242 |
| 5775 | Ítróttaranlegg løgukarmur | Lækking | -240 |
| 6175 | Keyp og søla av fastari ogn | Lækking | -1.500 |
| 6110 | Røkt av bygningum | Lækking | -8.518 |
| 3214 | Børn og ung, Umvælingar o.a. | Lækking | -500 |
| 3175 | Dagstovnurin í Hoyvík | Hækking | 12.000 |

**Býráðið 26. mai 2011:** Tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Nevndin samtykti at útseta málið til komandi fund.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**135/11 2011-0873**

**Ungdómscafé í Býlingshúsinum á Norðasta Horni**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Kommunan hevur sett sær fyri at skapa góðar og mennandi umstøður fyri ungdómin í allari Havnini. Margarinfabrikkin varð sett á stovn í 1995, í 2009 varð ungdómshús sett á stovn í Nólsoy og í Hoyvík. Hesir stovnar eru sera væl umtóktir og væl vitjaðir av teimum ungu. Nú er tíðin komin til Vesturbýin, har ynski hevur verið um eina ungdómscafé á Norðasta Horni. Leiðarin í Býlingshúsinum á Norðasta Horni hevur játtað, at ungdómscaféin kann halda til í miðrúminum í Býlingshúsinum, eisini hevur leiðarin játtað at hava leiðsluna um hendi, tó treytað av, at lønin fylgir við ábyrgdini. Ein annar møguleiki er, at ungdómscaféin gert partur av t.d. Margarinfabrikkini. Væntast kann, at áleið 20 til 30 ung fara at taka av hesum tilboðnum.

Fyri at ungdómscaféin ikki skal órógva dagliga virksemi í Býlingshúsinum, er neyðugt við nøkrum broytingum. Ein durur skal gerast út frá miðrúminum, har møguligt er at seta skógvarnar og heingja sær jakkan. Eisini er neyðugt at keypa spøl og teldur. Sambært Húsaumsitingini verður dururin mettur at kosta kr. 60.000,00. Útreiðslur til tilfar og spøl eru mettar at kosta kr. 100.000,00.

Ætlanin er at lata ungdómscaféina upp 1. september 2011, og hava opið tvær ferðir um vikuna. Rakstrarútreiðslurnar verða kr. 80.000, 00 frá 1. september til 31. desember 2011.

**Mentamálanevndin 30. mars 2011:** Katrin Petersen kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
Mett verður skilabest at skipa tilboðið um "Ungdómscafé" á Norðasta Horni fyrst sum royndarverkætlan í verandi hølum í Býlingshúsinum til 1. januar 2012, tá ein eftirmeting verður gjørd av tiltakinum, eisini við atliti at undirtøkuni. Støða verður síðani tikin til at gera broytingar, sum nevndar eru omanfyri.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri Barna- og Ungdómsdeildina mæla mentamálanevndini til, at kr. 100.000,00 verða settar av til keyp av tilfari og spølum. Peningurin verður játtaður av kontu 3214 - 165100 á Barna- og Ungdómsdeildini. Harumframt verður mælt til at játta kr. 80.000,00 av kontu 3215 - 147902 á Barna- og Ungdómsdeildini til rakstur.

**Mentamálanevndin 15. juni 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið 16. juni 2011:** Kunnað varð um málið.

**136/11** **<u>2009-3106</u>**

**<u>Tórshavnar Musikkskúli – útvegan av hølum</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tórshavnar Musikkskúla tørvar betri hølisumstøður. Nevndin fyri Musikkskúlan hevur áhaldandi gjørt vart við hendan spurningin, og býráðið hevur javnan havt málið til umrøðu.

Nú er ætlanin at taka málið uppaftur. Í hesum umfarinum verður miðað eftir at fyrireika ætlanir at útvega Musikkskúlanum hølir, sum eru ætlað til endamálið, og at gera av, hvar hesi hølir skula vera.

Áhugin fyri at fáa frálæru í Musikkskúlanum er ovurstórur, og ikki er gjørligt at ganga øllum umsóknum á møti. Hetta er m.a. ein spurningur um, hvørja rakstrarjáttan skúlin hevur. Sum er rinda Mentamálaráðið og kommunan raksturin.

Musikkskúlin húsast í dag í mongum ymsum hølum kring um í býnum. Miðstøðin á Frúutrøð er ein gamal barnaskúli, sum hjálpt er uppá, men sum ikki gevur nøktandi umstøður.

Til tess at fáa gongd á fyrireikingar til at útvega Tórshavnar Musikkskúla tíðarhóskandi karmar verður mælt til at játta pening at fara undir neyðugt fyrireikingararbeiði.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 1041-90-41002, Læknamiðstøð í Hoyvík, til staðseting/fyrireiking av musikkskúla, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyrireikingararbeiðið higartil hevur fevnt um møguliga staðseting av nýggjum Musikkskúla og lýsing av hølistørvi.

Samskiftið hevur verið við Norðurlandahúsið um staðseting á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Norðurlandahúsið tekur væl undir við hesi staðseting, sum tó ikki skal ganga Norðurlandahúsinum ov nær.

Samskiftið hevur eisini verið við Musikkskúlan – bæði leiðara, umboð fyri lærarar og umboð fyri musikkskúlanevndina – um hølistørvin eins og um krøv til slíkan nýbygning sum heild. Skúlin hevur sent umsitingini meting um dagførdan hølistørv.

Til tess at koma meira ítøkiliga víðari skal avtala gerast við ráðgeva um at fáa gjørt dagførda byggiskrá og skitsuuppskot, sum lýsir ymsar loysnir bæði viðvíkjandi staðseting, skapi og byggilistarligum hugskoti. Fyrireikingararbeiðið er grundarlag fyri viðgerð og avgerð um endalig staðseting og víðari tilgongd. Játtan er til endamálið. Setast skal eisini ein bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at sett verður bygginevnd fyri nýggjum Musikkskúla, og at gjørd verður ráðgevaraavtala um byggiskrá, skitsuuppskot v.m.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. juni 2010:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Gunnar Mohr

Í bygginevndina vórðu valdir Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Fyrireikingararbeiðið er nú komið so mikið áleiðis, at byggiskrá skal gerast. Byggiskráin skal lýsa byggiætlanina, herundir rúmskrá, fermetrar og ymisk funktiónskrøv. Sambært politisk-fyrisitingarligu mannagongdini fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal faknevndin biðja um byggiskrá, sum bygginevndin síðani útvegar.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at biðja bygginevndina útvega byggiskrá, og at tað í hesum sambandi verður játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukontu 5175.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Mayfinn Norðoy, arkitektur, greiddi frá projektinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukonto 5175.

**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundi 1. juni 2011 samtykti bygginevndin formliga at senda byggi- og býarskipanarnevndini um mentamálanevndina umbøn um at viðgera og góðkenna staðseting av nýggjum Musikkskúla á matrikklarnar 1453a, 1410d (lutur I) og 1409 (lutur I), eigari Tórshavnar kommuna, samsvarandi skitsuuppskoti.

Umbønin hjá bygginevndini skal síggjast í ljósinum av, at arbeiðið við skitsuuppskoti og byggiskrá er um at verða liðugt. Bygginevndin hevur alla tíðina arbeitt við staðseting eystanfyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Bygginevndin hevur mett at henda staðseting er væl egnað til Musikkskúla, tí hetta liggur væl fyri í mun til stóru ferðsluæðrirnar, og at Musikkskúlin og Norðurlandahúsið sum nærmastu grannar fara at fáa gagn av hvørjum øðrum serliga í mun til konsertvirksemi og høli.

Sambært galdandi mannagongd fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal byggi- og býarskipanarnevndin góðkenna staðseting, eftir at avvarðandi faknevnd hevur góðkent byggiskránna.

Staðsetingin og byggiskráin eru ikki viðgjørd av umsitingini á Byggi- og býarskipanardeildini undan hesum fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Málið varð útsett.

**Mentamálanevndin 15. juni 2011:** Samtykt at taka undir við bygginevndini og beina málið víðari í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

137/11 **2011-0917**

**Tíðaravmarkað forboð fyri almennari ferðslu í gongugøtuni í miðbýnum, galdandi fyri summarið 2011 sum royndarverkætlan**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Seinastu árini hevur nógv verið tosað um, at fáa lív í miðbýin.

Politiskt ynski er um, at nevndin tekur støðu til at steingja gongugøtuna í miðbýnum, frá Káta Horninum oman til býráðssalin, sum ein royndarætlan í tíðarskeiðnum frá 01.05.11 til 31.08.11. Samstundis er ynski um, at fáa góðkenning til at geva loyvir til sølubúðir, útiservering, tónleikatiltøk, barnatiltøk o.l. í gongugøtuni hetta tíðarskeið, sum bæði verður vent móti tænastuveitingum til ferðandi, herundir ferðamannaskipini, og til borgarar annars.

Spurningurin um vørulevering v.m. til verandi handlar og bygningar framvið gongugøtuni, og til uppsettar sølubúðir, verður loystur við at økið verður opið fyri vørubilum millum kl. 23 á kvøldi og kl. 10 á morgni.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Levi Mørk og Jákup Símun Simonsen, tekur undir við at steingja gongugøtuna í miðbýnum fyri bilaferðslu, frá Káta Horninum oman til býráðssalin, tó við tí broyting at tíðarskeiðið skal verða frá 01.06.11 til 15.08.11.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við at steingja gongugøtuna í miðbýnum, frá Káta Horninum oman til býráðssalin.

**Ískoyti:**
Sjúrður Olsen biður um málið á skrá.

**Býráðið 16. juni 2011:**

Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Inga Dahl og Anfinn Brekkstein, seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

*"Mælt verður til, at gongugøtan frá Káta Horninum til býráðssalin verður latin upp aftur fyri bilferðslu beinanvegin, og at borgarstjórin fær heimild at lata gøtuna aftur fyri bilferðslu í styttri tíðarskeið, tá okkurt størri tiltak er í miðbýnum, og handlarnir í miðbýnum verða kunnaðir."*

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

# Mál uttan fyri skrá

138/11 **2011-0075 sí eisini j.nr. 2006-1931**

**Sparkivøllur**

"Vit hava 20 børn undir 15 ár í bygdini, og tí meta vit, at hóskiligt hevði verið at lagt ein sparkivøll á matr. nr. 20c, sum kommunan eigur (har vakstrarhúsið stóð)".

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 13. desember 2010:** Heita á mentamálanevndina um at taka málið upp, so arbeiðið kann byrja í 2011.

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 14. mars 2011:** Borgarstjórin fekk handað skriv við ynski frá 25 børnum, sum ynskja sama slag av vølli til fótbólt sum í Gundadali, bara minni. Gott og turt undirlag. Sí skriv frá børnunum. Málið beint í mentamálanevndina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at finna staðseting til sparkivøll í Kirkjubø.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Staðbundnu limirnir spyrja hvussu langt málið er komið, hvussu sær tíðarætlanin út, og ber til at síggja eitt møguligt projekt?

**Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 30. mai 2011:** Tóri í Hoyvík kunnaði um málið.

Nevndin tók undir við staðsetingini.

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur støðu til staðseting av vøllinum á fundi í dag 30. mai 2011.

**Ískoyti:**
**Gamalt mál um sparkivøll í Kirkjubø 2006-1931.**

***Fótbóltsvøllur í Kirkjubø.***

***Lýsing av málinum – samandráttur:***
*Áheitan frá staðbundnu limunum um at fáa ein graslíkisvøll í Kirkjubø har vakstrarhúsið fyrr stóð.*

***Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 12. juni 2006:*** *Samtykt at heita á býarverkfrøðingin um at koma við uppskoti um, hvar ein sparkivøllur kann liggja og eini kostnaðameting.*

***Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 27. november 2006:*** *Nevndin heitir á byggi- og býarskipanarnevndina at raðfesta ein fótbóltsvøll í Kirkjubø.*

***Kirkjubøar-velbastaðarnevndin 21. mai 2007:*** *Eingin peningur er settur av í 2007.*

*Staðseting av øki.*
*1.*
*Sambært byggisamtyktini fyri Kirkjubø er bert eitt øki at vísa til í Kirkjubø, tað er økið F, Alment Frítíðarøki, ið liggur millum endan á vegnum í Geilini nr. 17, óbygt grundstykki, og sethúsini Ovaraveg 16. Økið er privatogn hjá Sigrid H. Djurhuus, matr. nr. 37-25b, vídd 5.500 m², harav uml. 2140 m² eru fevndir av ásetingini F. Økið verður í dag brúkt sum trøð og rabarbugarður v.m.*

*2.*
*Onnur staðseting er á kommunala økinum matr. nr. 20c, sum kommunan keypti í 2003 frá táverandi Føroya Jarðarráð.*

*Byggisamtyktin sigur, at økið er lagt av til: J Bóndahús, ásetingar fyri øki J eru: Økið verður lagt av til bygging í sambandi við djórahald og jarðarbrúk, og bert er loyvt at hava eini hús til hvørt festi. Sí hjáløgdu skjøl um ásetingarnar.*

*Søluskeyti, 12. desember 2003, millum Føroya Jarðarráð og Kirkjubøar kommunu, treytar m.a., at: " Stykkið verður at nýta samsvarandi byggisamtykt kommununar". Hetta tilskilar Búnaðarstovan altíð.*

*Mett verður at ásetingarnar í byggisamtyktini og treytirnar í skeytinum eru til hindurs fyri at gera graslíkisvøll á nevnda stað. Fyri at leggja bóltvøll á hesum stað, verður neyðugt at broyta byggisamtyktina, soleiðis at verandi J øki verður broytt til F, sum er alment frítíðarøki.*

*Lendisdeildin hevur gjørt uppskot til staðsetan av vølli í Kirkjubø á matr. nr. 37-20c, og kostnaðarmeting kr. 300.000 kr.*
*Vøllurin verður 21x13 m, við graslíki av sama slag sum smærru vallirnir, ið gjørdir vórðu á sumri 2007, og við heimagjørdari girðing, sum vøllurin Eystan Gil.*

***Tilmæli.***
*Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við uppskotinum, at byggisamtyktin verður broytt.*

***Byggi- og býarskipanarnevndin 12. desember 2007:*** *Nevndin samtykti at umsitingin kannar um serligar ætlanir hava verið við keypinum av ognini.*

*Ein arbeiðsbólkur settur av Kirkjubøar kommunu og Tórshavnar kommunu hevur saman við MAP arkitektum í oktober 2003 gjørt eitt fyribils skitsu- og programmuppskot til Ellisheim á økinum.*

*Bygdaráðið avgjørdi 2. oktober 2003 at broyta byggisamtyktina soleiðis at økið við gamla vakstrarhúsið í Kirkjubø verður broytt til E-øki( svarar til A3-øki í Tórshavnar kommunu).*

*Økið er ikki E-øki í dag, men J-øki, sambært omanfyri nevndu byggisamtykt, sí pkt. 2.*

*-Niðustøða.*
*Tað gongur ikki fram av málsgongdini, at serligar ætlanir hava ligið til grund fyri keypinum av økinum. Hóast samráðingar hava verið um skitsu- og programm fyri bygging av ellisheimi.*

***Tilmæli:***
*Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina, so samsvar er millum ynskir og og byggisamtyktarásetingar.*

***Byggi- og býarskipanarnevndin 4. februar 2008:*** *Samtykt at taka undir við tilmælinum.*

*Staðbundnu limirnir spyrja eftir status í málinum.*

***Kirkjubøar- og velbastaðarnevndin 5. mars 2008:*** *Kunnað varð um málið. Málið fer aftur fyri í byggi- og býarskipanarnevndina.*

*Nevndin ynskir at vøllurin verður tikin við í raðfestingini hjá kommununi fyri..*

Gamalt mál sparkivøllur endar.

**Ískoyti:**
Málið hevur verið lýst í 2006, men varð tá útsett í raðfestingini av bóltvøllum. Býarskipanarnevndin samtykti 4. februar 2008 at broyta byggisamtyktina fyri økið, so at samsvar var millum nýtslu og ásetingar.

Staðsetingin, ið skotin verður upp er hin sama sí kortuppdrátt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitektuirn mæla enn einaferð til at staðseta vøllin sum áður mælt til í mál nr 2006-1931 og at broyta byggisamtyktina fyri økið, so hon hóskar til nýtsluna, samsvarandi samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 4. februar 2008.

Maria Hammer Olsen var ikki við til hetta mál.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2011:** Nevndin góðkennur staðsetingina og tekur undir við at broyta byggisamtyktina tilsvarandi.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**139/11** **2010-1336**

**Skúladepilin við Marknagil – makaskifti**

**Lýsing av málinum:**
Í sambandi við byggingina av skúladeplinum í Marknagili hevur Landsverk ov lítið av lendi tøkt til at lúka ásetingar í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil um byggi- og nettonýtslustig. Til tess at lúka hesar treytir, kann kommunan geva Landsverki loyvi til at nýta part av øki kommununar sum grundarlag undir útrokningini av byggi- og nettonýtslustiginum, sbr. serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil § 5, stk. 1. Talan er í høvuðsheitinum um D1 øki.

Kommunan og búnaðarstovan hava umrøtt møguleikan fyri, at kommunan afturfyri henda rætt yvirtekur øki í Sandágerði og traðir/urtagarðsstykki á Ternuryggi fram við Hoydalsá. Talan er um hesi øki:

**Tórshavnar Kommuna letur:**

| | |
|---|---|
| Matr. nr. 1177, til víddar | 16.175 m2 |
| Matr. nr. 1174, til víddar | 10.827 m2 |
| Part av matr.nr. 1101 og 1100, uml. | 4.090 m2 |
| Íalt uml. 31.192 m2. | |

**Búnaðarstovan letur:**

| | |
|---|---|
| Matr.nr. 979a, (Sandágerð) | 12.371 m2 |
| Matr.nr. 985, (Sandágerð) | 75 m2 |
| Matr.nr. 979c, (Sandágerð) | 2.872 m2 |

Harumframt letur Búnaðarstovan flestallar traðir og urtagarðsstykki á Ternuryggi fram við Hoydalsá, eftir nærri avtalu og góðkenning frá avvarðandi myndugleika.

Búnaðarstovan kemur tá at lata størri lendi enn kommunan, men økið, ið Búnaðarstovan letur, er meira avmarkað nýtsluligt og kemur at krevja umsiting og eftirlit frá kommununnar síðu, m.a. av leigumálum, men samstundis fær kommunan ræðisrættin á økinum.

**Tilmæli:**

Miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at taka prinsippavgerð um, at Landsverk kann nýta part av øki kommununnar, matr. nr. 1177, 1174, 1101 og 1100, Tórshavn, sum grundarlag undir útrokningni av byggi- og nettonýtslustiginum ísv. Byggingina av skúladepli við Marknagil.

Samstundis verður mælt til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar um endaligar treytir fyri yvirtøku av lendi frá Búnaðarstovuni í Sandágerði og traðir og urtagarðsstykki á Ternuryggi framvið Hoydalsá eftir omanfyristandandi leisti.

Tóri í Hoyvík var við til hetta máli.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**140/11** **<u>2002-2771, sí eisini j. nr. 2011-0696</u>**

**<u>Viðvíkjandi leigu av hølum til Argja skúla</u>**

Sambært avtalu millum Ramirent og Tórshavnar kommunu um leigu av fyibilshølum til Argja skúla, skal Tórshavnar kommuna rinda útreiðslurnar fyri niðurtøku og flutning av hølunum. Hesar útreiðslur eru 100.330,00 kr. u/mvg.

Sambært leigusáttmála millum Postverk Føroya (Vinnumálaráðið) og ískoyti til sáttmálan skal Tórshavnar kommuna lata tað leigaða aftur í sama standi, sum tá leigusáttmálin varð undirskrivaður. Kostnaðurin at seta økið uttanfyri Umhvørvisstovuna í sama stand aftur er 176.908,00 kr. u/mvg.

| | |
|---|---|
| Fyribilshølini niðurtøka og flutningur | 100.330,00 |
| Avrigging á Umhvørvisstovuni uttandura | 176.908,00 |
| Kostnaður íalt | **277.238,00** |

**Tilmæli:**
Trivnaðastjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 277.238,00 kr. umframt mvg í alt 294.565,37 av konto 4175 - Dagføring av skúlum - til niðurtøku og

flutning av fyribilshølunum, sum eru leigað til Argja skúla og til at gera økið uttanfyri Umhvørvisstovuna í stand aftur.

**Mentamálanevndin 15. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at taka undir við tilmælinum.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini í fyriliggjandi máli og máli 2011-1420 og játta kr. 294.565,37 umframt kr. 900.490,00 v. mvg. av konto 4175 - Dagføring av skúlum.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**141/11** **2011-1420**

**Viðvíkjandi flyting av parti av Kommunuskúlanum í Argja skúla**

Í sambandi við, at partur av Kommunuskúlanum verður fluttur í Argja skúla næsta skúlaár, eru samskiparar settir á uppgávuna at skipa flytingina og tillagingar í Argja skúla og í Kommunuskúlanum.

Í Kommunuskúlanum skulu hølini til heimkunnleika gerast til eitt vanligt undirvísingarhøli.

Í Argja skúla skulu onkrar smávegis tillagingar gerast umframt tillagingar til KT.

Partur av bókasavninum og partur av bókagoymsluni hjá Kommunuskúlanum verður fluttur í Argja skúla. Haraftrat verður alis- og evnafrøði flutt.

Samvirknar talvur og onnur Kt-útgerð skal setast upp í undirvísingarhølunum í Argja skúla, og netið skal lagast til.

Samskipararnir hava gjørt eina kostnaðarmeting av flyting, tillagingum og ráðgeving. Sambært kostnaðarmetingini eru útreiðslurnar fyri flyting, tillagingar og ráðgeving 967.976,00 kr. u/mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðastjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 967.976,00 kr. umframt mvg í alt 1.028.474,50 av konto 4175 - Dagføring av skúlum - til flyting av Kommunuskúlanum í Argja skúla, tillagingar í báðum skúlunum og til ráðgeving.

**Mentamálanevndin 15. juni 2011:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at játta kr. 847.520,00 umframt mvg í alt kr. 900.490,00 av

konto 4175 - Dagføring av skúlum - til flyting av Kommunuskúlanum í Argja skúla, tillagingar í báðum skúlunum og til ráðgeving.

**Fìggjarnevndin 15. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini í fyriliggjandi máli og máli 2011-1420 og játta kr. 294.565,37 umframt kr. 900.490,00 v. mvg. av konto 4175 - Dagføring av skúlum.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**142/11** **2007-1719**

**Serstøk byggisamtykt fyri "Útstykking 200" eystan fyri Karlamagnusarbreyt.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
"Útstykking 200", eystan fyri Karlamagnusarbreyt og norðan fyri Hoyvíkar skúla, er uml. 22.000 fermetrar til støddar. Henda útstykking liggur í einum A3 øki, sum sambært byggisamtyktini, kann nýtast til bústaðir.

63 grundøki, ið eru 200 fermetrar til støddar. Samlaða grundøkið er 300 fermetrar fyri hvørt, har uml. 100 fermetrar verða lagdir til fríøki, sokallað Tún. Túnini eru 3 í tali, og liggja hesi við atgongd frá Karlamagnusarbreyt.

Atgongd verður til alla útstykkingina frá Karlamagnusarbreyt. Í uppskotinum eru 3 atkomur. Framvið útstykkingini á atkomusíðuni móti Karlamagnusarbreyt, verður ein býlingsvegur, ið kann nýtast, um tørvur skuldi verið á tí. Hetta kann t.d. verða galdandi um ein av atkomuvegunum er ringur at koyra eftir í t.d. hálku ella av aðrari orsøk.

Atkomuvegurin leiðir bilar og fólk inn til Túnini, ið verða savnandi fyri býlingin. Frá Túnunum verða minni húsavegir inn til tey einstøku húsini. Øll felagsparkering, renovatión, møguliga postskipan, bilavask o.a. og spæl verður miðsavnað um Túnini.

Til hvørt Túnið hoyra uml. 20 hús. Húsini standa á einum grundøki, ið eru uml. 200 fermetrar til støddar. Húsini eru 8,75 x 6,25 metrar til støddar, úthúsini/bilhúsini eru 5,50 x 3,75 metrar til støddar. Planering og sokklar til húsini og úthúsini/bilhúsini verða staðsettir av TK.

Staðsetingin av húsum og úthúsum/bilhúsum verður samtykt í eini serstakari byggisamtykt fyri "Útstykkingina 200", eystan fyri Karlamagnusarbreyt

Nú er eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri "Útstykking 200" gjørt.

Serstaka byggisamtyktin ásetur treytir fyri bygging v.m. og nágreinar ymisk viðurskifti í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at uppskotið um serstaka byggisamtykt fyri "Útstykking 200" verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juni. 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Nú avgerð er tikin um at fara í gongd við útstykkingina við Mylnutjørn, hevur umsitingin gjørt uppskot til at tillaga ætlanina soleiðis, at tað slepst undan at byggja brandmúrar ímóti grannamarki. Eisini er uppskot gjørt til at geva loyvi til at byggja karnappar, svalar o.a. eftir at fyrispurningar um hettar eru komin frá teimum sum hava fingið tillutað stykkir.

Tí hevur umsitingin gjørt uppskot um broytingar í serstøku byggisamtyktini hesum viðvíkjandi.

Tær flestu broytingarnar eru í § 4 um bygging, stødd, staðseting og snið húsanna.

Serstaka byggisamtyktin verður løgd fram á fundinum og uppskot til broytingarnar verða gjøgnumgingnar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at uppskotið um broyting av serstøku byggisamtykt fyri "Útstykking við Mylnutjørn", j.nr. 2007-1719/12, verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

**Býráðið 25. februar 2010:** Einmælt samtykt við tí ískoyti, at heiti skal broytast til "Útstykking við Myllutjørn".

**Ískoyti:**
Seinasta freist at koma við mótmælum ella broytingaruppskotum til serstøku byggisamtyktina var 19. apríl 2010.

Kommunan hevur móttikið tvey mótmæli/broytingaruppskot.

Tað eina mótmælið er felags frá 14 av keyparunum og snýr seg um avmarkingarnar av vindeygum ímóti marki.

Hitt mótmælið/broytingaruppskotið snýr seg um møguleika at samanbyggja sethús og bilhús og at nýta bilhústakið til altan.

Ummæli av mótmæli/broytingaruppskotum og tilmæli koma til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Nevndin samtykti at at beina málið í bygginevndina til ummælis áðrenn støða verður tikin.

**Ískoyti:**
Skriv er komið frá bygginevndini dagfest. 18 mai 2010, j.nr. 2007-1719/23. Skrivið verður framlagt á fundinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at uppskotið um broyting av serstøku byggisamtykt fyri "Útstykking við Mylnutjørn", j.nr. 2007-1719/12, verður góðkend.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við viðmerkingunum frá bygginevndini í skjali nr. 2007-1719/23 og heitir á umsitingina at kanna eftir um hesar kunnu arbeiðast inn í serstøku byggisamtyktina.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur við tilfari til fundin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskotinum til serstaka byggisamtykt við hesum broytingum:

*§4, stk. 6.2.: Húsaendi móti koyrivegi kann ikki hava vindeygu nærri enn 0,9 m upp frá gólvi á 1. hædd.*

*Nýtt §4, stk. 6.3: Húsaendi móti fríøki og gøtu, felagsøkini undantikin, kann ikki hava vindeygu nærri enn 0,6 m upp frá gólvi á 1. hædd.*

**Býráðið 24. juni 2010:** Einmælt samtykt, at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini 14. juni 2010, við tí ískoti til §4 stk. 1.5, at ásetingin ikki er galdandi fyri hús 8, 23, 38 og 54.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at mótmæla uppskotinum til serstaka byggisamtykt var mánadagin 30. august.

Tá freistin var farin hevði TK móttikið eitt mótmæli/broytingaruppskot.

Hetta mótmæli er frá eigaranum av stykki 27, sum hevur felagsøki/tún sum granna. Hann ynskir at húsini, sum standa í mark ímóti felagsøki skulu hava somu

undantøk sum tey sum standa í mark ímóti fríøki. T.v.s. ongar treytir um betongvegg í 3 m hædd og ongar avmarkingar vindeygum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at halda fast við býráðssamtyktina frá 24. juni 2010 vísandi til, at broytingar í avmarkingunum ímóti felagsøkjum/túnum vil viðføra stórar skerjingar fyri nýtsluna av hesum, ið eru ætlaði sum tilhaldspláss hjá øllum íbúgvunum í økinum umframt vegatgongd til og frá húsunum.

Jan Christiansen var ikki við til hetta málið.
Elin Lindenskov var við til hetta málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 21. oktober 2010:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri Myllutjørn hevur við skrivi dagfest 9. juni 2011 heitt á byggi- og býarskipanarnevndina um at loyva at bilhúsini verða gjørd breiðari, soleiðis at tey flukta við sethúsini.

Sambært verandi ásetingum eru grundstykkini 10,5 m breið, byggifeltið til sethúsið er 6,25 m og til bilhúsið 3,75 m.

Í serstaku byggisamtyktini stendur soleiðis í §4:

> Stk. 2 Byggifelt 2 er til bilhús/úthús
> Mest 2.1. loyvda stødd mált uttan er 5,50 x 3,75 m.
> 2.2. Byggjast kann í einari hædd.
> 2.3. Mest loyvda hædd er 4,50 m mált frá planeringshædd, tó er mest loyvda hædd móti granna 2,5 m.
> 2.4. Síða í mark skal verða 20 cm betongveggur í 2,5 m hædd. Hetta er tó ikki galdandi fyri hús nr. 15, 30, 45 og 64
> 2.5. Tak skal verða minst BD-húsalutur 60. Hetta er tó ikki galdandi fyri hús nr. 15, 30, 45 og 64
> Sí kortskjal nr. 3 og 4.

Um bilhúsini skulu breiðkast soleiðis at tey flukta við sethúsini, kunnu byggifeltini víðkast, soleiðis at breiddin verður 4,25 m.

Hendan broyting kann ikki gerast sum frávik, tí hon rúmast ikki innanfyri ásetingarnar í Serstøku byggisamtyktini §7 um undantaksloyvi frá byggisamtyktini og broytingar, har tað stendur, at byggivaldið kann geva smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Skulu byggifeltini til bilhús/úthús gerast størri, so er neyðugt at broyta serstøku byggisamtyktina tilsvarandi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtyktina, soleiðis at byggifeltið til bilhúsið verður breiðkað frá 3,75 m til 4,25 m.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 16. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**FUNDUR LOKIN KL. 19.30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Inga Dahl | Levi Mørk |
| Maria H. Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |